Marna Jacobsen



# KYNSLEIKLUTIR

## Í FØROYSKUM LESIBÓKUM 1. - 3. FLOKK

Javnstøðunevndin

Marna Jacobsen



# KYNSLEIKLUTIR

## Í FØROYSKUM LESIBÓKUM 1. - 3. FLOKK

KOLOFON

Kynsleiklutir í føroyskum lesibókum 1. - 3. flokk
© Marna Jacobsen og Javnstøðunevndin, 2010
www.javnstoda.fo

Uppseting og layout: AnniJanni
Prent: Scan Design
ISBN: 978-99918-3-302-6

# INNGANGUR

***Millum uppgávurnar hjá Javnstøðunevndini er at hava eftirlit við, at frálærutilfar til undirvísing og uppaling barna skal samsvara javnstøðuhugsjónini í javnstøðulógini.***

Javnstøðunevndin tók í 2008 avgerð um, at ein kanning skuldi gerast av undirvísingartilfari í fólkaskúlanum. Hetta arbeiði var eitt framhald av eini verkætlan, sum táverandi forkvinna hevði tikið stig til í 2005, og sum Marna Jacobsen, cand.mag., varð biðin um at standa fyri.

Á heysti 2009 kundi Marna Jacobsen lata Javnstøðunevndini kanningina, sum hevði fingið heitið Kynsleiklutir í føroyskum lesibókum 1. – 3. flokk. Síðani ynskti Javnstøðunevndin at gera kanningarúrslitini atkomulig fyri so nógv fólk sum gjørligt, og vit komu ásamt við høvundan um, at tilfarið skuldi styttast nakað og gevast út. Úrslitið er hesin bóklingurin.

Bóklingurin er ætlaður teimum, sum arbeiða við at framleiða undirvísingartilfar. Hann er ætlaður lærarum og lesandi á læraraskúlum umframt øllum, sum hava áhuga í, hvussu kynsleiklutir hava verið lýstir og framvegis verða lýstir í tí tilfari, sum verður brúkt í móðurmálsundirvísingini hjá børnum í yngstu skúlaflokkunum í fólkaskúlanum.

Móðurmálsundirvísing hevur sjálvsagt ómetaliga stóran týdning fyri skapanina av bæði tí einstaka barninum, felags mentanini og tí hugburði, sum er galdandi í samfelagnum. Hvussu vænta vit, at ávikavist gentur og dreingir, at konur og menn, bera seg at? Og hvør er boðskapurin um væntaðar kynsleiklutir, sum vit leggja niður í okkara yngru ættarlið?

Um kynsleiklutirnir eru ov eintáttaðir, kann tann boðskapur, sum verður borin víðari til gentur og dreingir, gerast ov ótíðarhóskandi. Hetta kann so aftur vera avmarkandi fyri, hvørjar møguleikar tey duga at fáa eyga á, bæði í undirvísing og spæli, og, sum árini líða, eisini í arbeiði og frítíð.

Í Føroyum eru vit nógv ár eftir onnur lond um okkara leiðir, tá ið talan er um tilvitað og miðvíst arbeiði fyri øktari javnstøðu í samfelagnum. Við hesari og øðrum kanningum av spurningum, sum viðvíkja javnstøðu millum kyn, ynskir Javnstøðunevndin at vera við til at skapa eitt grundarlag undir fruktagóðum orðaskifti um, hvussu vit øll, bæði myndugleikar, fakbólkar og einstaklingar, kunnu gera okkara til at mýkja galdandi fatanir av kynsleiklutum, og av, hvat er gjørligt, og hvat eigur at vera gjørligt hjá gentum og dreingjum, eins væl og hjá kvinnum og monnum.

Virðingarmest,

Javnstøðunevndin í mai 2010

# INNIHALD


1. Verkætlanarlýsing 7
2. Leiklutir/kynsleiklutir 8
3. Kanningarspurningar 9
4. Upprunatilfar í føroyskum í 1.-3. flokki 10
5. Teksthøvundar 12
6. Myndprýðingar 14
7. Eldri tilfar 15
    *A.C.Evensen: Harubókin 15*
    *Hans A. Djurhuus: Barnabókin 17*
    *Elsebeth Vestergaard: Pisubøkurnar 18*
    *Jeffrei Henriksen: Perbók 19*
    *Poul E. Petersen: Mín fyrsta lesibók 21*
    *Samandráttur: Kynsleiklutir 1907-1967 23*
8. Yngri tilfar 28
9. Hervør og Høgni 31
10. Mál og kynsleiklutur 38
11. Norðurlendsk gransking í kyni, javnstøðu og skúla 40
12. Samandráttur 42
13. Keldur 46

# VERKÆTLANARLÝSING

*Undirvísingartilfar til yngstu flokkarnar í fólkaskúlanum*

1

## Grundarlag

Í grein 7 í lóg um javnstøðu er ásett:
§ 7. Frálærutilfar til undirvísing og uppaling barna skal samsvara javnstøðuhugsjónini í hesi lóg.
Stk. 2. Øll lestrar- og starvsfrálæra skal leggjast soleiðis til rættis, at bæði kynini hava eins góðan møguleika at velja millum tey tilboð, undirvísingarstovnurin veitir.

Marna Jacobsen, cand. mag. og ritstjóri á Bókadeild Føroya Lærarafelags, fekk í 2005 áheitan frá táverandi forkvinnu í Javnstøðunevndini, Anniku Wardum Joensen, um at gera eina kanning av, hvussu stóð til við undirvísingartilfari í fólkaskúlanum í mun til javnstøðuhugsjónina. Arbeiðið datt tó niðurfyri, tá ið forkvinnan í Javnstøðunevndini fór frá.

Javnstøðunevndin heitir nú á Marnu Jacobsen um at halda fram við arbeiðinum og gera kanningina lidna.

## Kanningin

Marna Jacobsen hevur avgjørt at kanna undirvísingartilfar í føroyskum til 1., 2. og 3. flokk. Kanningarspurningarnir eru:

- Hvat tilfar finst til 1., 2. og 3. flokk í føroyskum?
- Hvat siga tekstirnir um leiklutirnar hjá kynunum?
- Er rithøvundurin maður ella kvinna?
- Hvat siga myndir um leiklutirnar hjá kynunum?
- Hevur maður ella kvinna teknað myndirnar?
- Samanbering:
  Er broyting at síggja í undirvísingartilfarinum í tíðarskeiðinum 1970 til í dag?
- Ber til at gera ein frymil fyri, hvussu undirvísingartilfarið kann gerast við hugburðinum um javnstøðu millum kyn í huga?

# 2 LEIKLUTIR/ KYNSLEIKLUTIR

Fyri at kunna siga nakað við skili um evnið er neyðugt at skilmarka hugtakið leiklut/kynsleiklut.

Til hetta endamál havi eg brúkt svenska granskaran Ingu Wernersson, sum í mong ár hevur granskað júst í hesum evninum.

Innihaldið í hugtakinum leikluti kann vera ymiskt, alt eftir hvaðani tú velur útgangsstøði:

1. Leiklutir kunnu fatast úr samfelagsfrásjón. Tvs. at leiklutir, sum partar av sosialum positiónum, fáa ein samfelagsligan, og av tí sum ber leiklutin, ein óheftan eksistens. Onkuntíð verða leiklutir til serligt samfelagsligt virki.

2. Leiklutir kunnu fatast úr frásjónini hjá einstaklinginum. Tá verður dentur lagdur á týdningin av, hvussu leiklutir skapa persónsmenskuna hjá tí einstaka, á sama hátt sum sosialar væntanir stýra gerðum og vilja hjá einstaklinginum.

3. Leiklutir kunnu fatast úr einari relatiónsfrásjón, tvs. hugtakið verður til eitt amboð at greina tey ymsu sløgini av samspæli millum einstaklingar. Hesin triði háttur kann eisini skiljast sum ein sambinding av teimum báðum frammanundan nevndu. Leiklutir kunnu tá lýsast sum sambindingarlið millum einstakling og samfelag. Hetta kann tískil kallast ein sosialiseringarfrásjón, har dentur verður lagdur á funktiónina í teimum interpersonellu relatiónunum, tá ið leiklutanormar verða lærdir og skulu halda samfelagsskipanini gangandi.

Innihaldið, ið verður lagt í hugtakið leiklut, kann tískil vera galdandi fyri eina avpersónifiseraða samfelagsskipan ella lýsa persónlig sambond millum menniskju ella partar av fatanini hjá einstaklinginum um seg sjálvan.

G. H. Mead lýsir innihaldið í leiklutum á ein hátt, soleiðis at tað fevnir um øll hugsandi sløg av menniskjaligum gerðum og atburðum. Hann brúkar hugtakið leiklutur og at átaka sær leiklut sum grundleggjandi mekanismur í, hvussu einstaklingurin háttar sær mótvegis sínum kringumstøðum. Sostatt verður tað ein partur av sosialu náttúrini í menniskjanum.

> "...in all intelligent processes
> we are able sufficiently to
> take the roles of those involved
> in the activity to make our
> own action intelligent."
> *(Mead 1934, bls. 256)*

Inga Wernersson heldur, at hugtakið um leiklut verður brúkt fyri at greina sambandið millum einstakling og samfelag, og at dentur kann leggjast á samfelag, einstakling ella relatiónina. Haraftrat førir hon fram, at hugtakið um leiklut verður brúkt bæði at lýsa eina menning og at lýsa ein meira og minni statiskan struktur.

Í samfelagsfrásjón er hugtakið leiklutur tætt knýtt at støðu- og statushugtakinum. Ein støða kann í hesum sambandi skilmarkast sum ávís rættindi og skyldur ella við øðrum orðum sum ávísir normar, ið hoyra saman við einum samfelagsligum virki.

Leiklutir kunnu bæði vera tillutaðir og ognaðir, tvs. at tú antin hevur fingið ein leiklut vegna ávísar eginleikar, ella at tú sjálv/ur ognar tær ein leiklut vegna tín serliga førleika.

At verða tillutað ein leiklut ber í sær, at flokkingin verður gjørd grundað á ytri fysiskar ella sosialar eginleikar, t. d. rasu, aldur, sosialan uppruna og kyn.

At ogna sær leiklut ber í sær, at einstaklingurin sjálvur hevur møguleika at velja ella kappast um samfelagsstøði. Leiklutir, tú hevur ognað tær, hava sum oftast hægri status, teir eru meiri virðismettir, nakað tú tráar meira eftir enn teir leiklutir, tú fært tillutaðar.

Tey bæði sløgini av rekruttering til støði í samfelagnum eru eisini knýtt at hvør øðrum, vegna tað at tillutan av leikluti regulerar og avmarkar møguleikarnar at ogna sær annað støði.

# KANNINGARSPURNINGAR

# 3

**Hvat yrki hava kvinnur og menn?**
**Hvat takast børn og vaksin við í frítíðini?**
**Hvussu verða kynini lýst? Útsjónd? Eginleikar?**
**Hvørjir eru leiklutirnir í familjuni?**
**Hvussu mangar kvinnur ávikavist menn eru í teksti og myndum?**

Mín uppgáva hevur verið at kanna frálærutilfar í fólkaskúlanum, og eg havi valt at kanna lesibøkur í føroyskum til 1.-3. flokk. Kanningin er av tekstum og myndum, sum eru í lesibókunum. Støðið er tikið í tveimum høvuðsspurningum:

1. **Hvørjir leiklutir verða tillutaðir gentu/dreingi – konu/manni í lesibókunum og**
2. **Hvørjar kendar persónar og verur úr ævintýri, søgn, kvæði, trúarlívi og søgu verður sipað til í tekstunum**

**Hetta havi eg gjørt fyri at síggja um**

1. **gentu/dreingjaleikluturin er statiskur ella varieraður og um**
2. **gentur/dreingir kunnu spegla sær í umleið líka nógvum leiklutafyrimyndum**

Tað hevur verið gjørligt at seta kanningina í søguligt sjónarhorn, av tí at eg í míni kanning havi valt at taka tær flestu lesibøkurnar við, ið eru skrivaðar til hesar flokkar í fólkaskúlanum. Tað eru skrivaðar umleið 16 beinleiðis lesibøkur í føroyskum, og av hesum havi eg tikið 11 við í kanningina.

Lesibøkurnar eru skrivaðar frá 1907 til í dag, og tær eru endurprentaðar fleiri ferðir, so ein bók, sum er skrivað í 1907, verður framvegis brúkt í trýssunum, og ein bók, skrivað í tjúgunum, verður framvegis brúkt í 70-unum. Tá farið varð undir í 80-unum at útgeva lesibøkur til annan og triðja flokk, varð valt at endurnýta eina rúgvu av gomlu tekstum.

Í grundini er tað ikki fyrr enn eftir ár 2000, at heilt nýggjar lesibøkur til 1.-3. flokk við heilt nýggjum tekstum síggja dagsins ljós.

# 4 UPPRUNA TILFAR Í FØROYSKUM Í 1.-3. FLOKKI

L - Lesibók, EY – Eykatilfar í lesing, LS – Lesi- og skrivitilfar, LU – Lesing og uppgávur

Kanningin av føroyskum lesibókum er fyrst og fremst grundað á tær bøkur, ið eru frámerktar við svørtum í listanum niðanfyri.

## Tilfar, ið helst ikki verður brúkt longur:

L - Poulsen, Johannesen: Førisk ABC og lesingabók, 1891
L - A.C.Evensen: Stavingarbók, 1907
L - A.C.Evensen: Lesibók fyri yngri børn, 1907
L - A.C.Evensen: Stavingarbók og Lesibók fyri yngri børn, 1907
L - Hans A. Djurhuus: Barnabókin I, 1923
L - Hans A. Djurhuus: Barnabókin II, 1924
L - Hans A. Djurhuus: Barnabókin, 1927
L - A.C. Evensen: Lesibók, fyrsti partur, 1929
L - Hans A. Djurhuus: Barnabókin, 1938
L - Hans A. Djurhuus: Barnabókin, 1947
L - A.C.Evensen: Lesibók fyri yngri børn, 1950
L - Hans A. Djurhuus: Barnabókin, 1957
L - Elisabeth Vestergaard: Pisubókin I, 1958
L - Jeffrei Henriksen: Lesibók við avmarkaðum orðatilfari, 1959
L - Hans A. Djurhuus: Barnabókin, 1960
L - Elisabeth Vestergaard: Pisubókin I, 1962
**L - A.C. Evensen: Harubókin, 1963**
**L - Elisabeth Vestergaard: Pisubókin II, 1963**
**L - Poul E. Petersen: Mín fyrsta lesibók, 1967**
**L - Elisabeth Vestergaard: Pisubókin I, 1968**
**L - Hans A. Djurhuus: Barnabókin, 1970**
EY - Jóhannes Enni: Sjálvlestur 1-5, 1973
EY - Jeffrei Henriksen: Lesibók við avmarkaðum orðatilfari, 1973

## Tilfar, ið enn verður brúkt:

LS - Hervør Jákupsson: Summardáin, 1975
LS - Hervør Jákupsson: Blákollan, 1976
LS - Hervør Jákupsson: Smæran, 1978
LS - Hervør Jákupsson: Sóljan, 1978
**L - Enni, Henriksen, Næs, Samuelsen, Sigvardsen, á Steig: Lesibók til 3. skúlaár, 1. partur, 1981**
L - Steinbjørn B. Jacobsen: Mia og Dia, 1982
L - Marianna Debes Dahl: Ása fer í skúla, 1983
**L - Enni, Henriksen, Næs, Samuelsen, Sigvardsen, á Steig: Lesibók til 2. skúlaár, 1983**
**L - Enni, Henriksen, Næs, Samuelsen, Sigvardsen, á Steig: Lesibók til 3. skúlaár, 2. partur, 1984**
EY - Jakob Jakobsen: Revurin, krákan og mýrisnípan, 1988
EY - Marianna Debes Dahl: Tunnuflakin, 1990
EY - V.U.Hammershaimb. Havfrúgv og nykur, 1990

EY - Jakob Jakobsen: Kjølur á Nesi, 1990
EY - Jakob Jakobsen: Revur og bjørn, 1990
EY - Jakob Jakobsen: Trøllini á Skálavøllum, 1990
EY - Martin Næs: Torbjørg og kúgvin, 1990
LU - Ellefsen, Hansen, Højgaard, Nolsø: Heimakrákan og aðrar søgur, 1992
EY - Marianna Debes Dahl: Húsið, 1993
EY - Maud Heinesen: Tá ið Karin fylti, 1993
LS - Gunnvá Dam. Firvaldsbók 1, 1998
LS - Gunnvá Dam. Firvaldsbók 2, 1998
LS - Gunnvá Dam. Firvaldsbók 3, 1998
LS - Gunnvá Dam. Firvaldsbók 1, 2000
LS - Gunnvá Dam. Firvaldsbók 2, 2000
LS - Hervør Jákupsson: Blákollan, 2000
LS - Hervør Jákupsson: Sóljan, 2000
LS - Gunnvá Dam. Firvaldsbók 3, 2001
**L - Hjørdis Heindriksdóttir: Hervør og Høgni í skúla, 2001**
EY - Steinbjørn B. Jacobsen: Eg eigi, 2001
LS - Hervør Jákupsson: Smæran, 2001
EY - Johan Joensen: Børnini í fjøruni, 2001
LS - Gunnvá Dam. Firvaldsbók 4, 2002
LS - Hervør Jákupsson: Summardáin, 2003
EY - Sólrún Michelsen: Morgun, 2003
**EY - Jeffrei Henriksen: Perbók, lesibók við avmarkaðum orðatilfari, 2004**
**L - Hovgaard, Berg. Hervør og Høgni og hini, 2004**
EY - Sólrún Michelsen: Vár, 2004
LS - Gunnvá Dam. Firvaldsbók 5, 2005
EY - Sólrún Michelsen: Abbin og apan, 2005
EY - Sólrún Michelsen: Jólagávur, 2005
L - Gunvør Højgaard: Súlan, 2007
**L - Hovgaard, Berg: Hervør og Høgni í triðja, 2008**
L - Gunvør Højgaard: Sólin sá ís í á, 2008
L - Gunvør Højgaard: Sólin sá lás í á, 2008
LS - Gunnvá Dam. Firvaldsbók 6, 2009
L - Gunvør Højgaard: Sólin sá Ásu og Óla í á, 2009
L - Gunvør Højgaard: Sólin sá bil og bát í á, 2009

Sjálvt um kanningin fyrst og fremst er ætlað at vera av lesibókum eftir 1970, havi eg hildið tað vera rættast at taka nakrar av klassisku lesibókunum fyri hetta árstal við í kanningina, hetta tí at hesir tekstir hava havt sera stóra rúmd í føroyskari lesibókasiðvenju, av tí at teir hava verið tiknir við í nýggjar lesibøkur heilt upp í okkara tíð.

# 5 TEKSTHØVUNDAR




Tilsamans er talan um 21 kvinnur við 70 tekstum og 59 menn við 736 tekstum í tilfarinum, sum kanningin fevnir um.

| | |
|---|---|
| H.A. Djurhuus: | 215 |
| **Elsebeth Vestergaard:** | **107** |
| **Hovgaard/Næs Berg:** | **91** |
| Poul E. Petersen: | 81 |
| Jeffrei Henriksen: | 81 |
| **Hjørdis Heindriksdóttir:** | **56** |
| A.C. Evensen: | 33 |
| V.U. Hammershaimb: | 17 |
| Marius Johannesen: | 17 |
| Alexandur Kristiansen: | 12 |
| Skúlanæmingar: | 11 |
| Jakob Jakobsen: | 11 |
| Mikkjal á Ryggi: | 9 |
| Óðin Ódn: | 6 |
| Jóannes Patursson: | 6 |
| Djóni í Geil: | 5 |
| Flóvin Flekk: | 4 |
| Grimm: | 4 |
| Oskar Hermannsson: | 4 |
| R.C. Effersøe: | 3 |
| Absalon Jógvansson: | 3 |
| Steintór Rasmussen: | 3 |
| Sverri Egholm: | 2 |
| N.F.S. Grundtvig: | 2 |
| Jákup Hansen: | 2 |
| **Jóhanna Maria Skylv Hansen:** | **2** |
| Christian Holm-Isaksen: | 2 |
| Steingrím Niclasen: | 2 |
| Johs. Andr. Næs: | 2 |
| **Anna Maria Petersen:** | **2** |
| Halfdan Rasmussen: | 2 |
| Petur J. Sigvardsen: | 2 |
| Símun av Skarði: | 2 |
| Louis Zachariassen: | 2 |



Hesi hava øll ein tekst við í onkrari lesibók:

Andreas Andreassen, Heðin Brú, Morten Børup, Regin Dahl, Hans Dalsgaard, **Marita Dalsgaard,** Victor Danielsen, Enni/Thomsen, **Hervør Eyðinsdóttir, Phyllis Flowerdew, Eva Forss,** Alex Garff, **Mia Hallesby, M. Heinesen,** Lennart Hellsing, Christian Høj, Finnbogi Isaksen, Steinbjørn B. Jacobsen, Martin Joensen (y), Poul Arne Joensen, Sigurð Joensen, Sjúrður Joensen, **Hjørdis Johansen,** Sámal Johansen, Johan Kalsoy, Jákup M. Kjeld, Hans Henrik Ley, Leonard Lipton, **Lucy Sprague Mitchell,** M. Moberg, Mourits Mohr, **Mirjam Nattestad, Gunnvá Niclasen,** Jacob Olsen, **Thurid Olsen,** Sverre Patursson, **Kirsten Pendrup, Ebba Munk Petersen, Sofía Petersen,** Alf Prøysen, Olivar á Ryggi, **Karin Samuelsen, Lina Sandell,** Jens Sigsgård, Leo Tolstoj, Steingrímur Weihe, Samson Højgaard.

Ein orsøk til, at so fáar kvinnur eru umboðaðar í tekstaúrvalinum, er sjálvandi tann, at tað eru lutfalsliga nógv fleiri menn, sum vit kenna til, ið hava skrivað og havt sítt ritverk á prenti.

Orsøkin til, at Elsebeth Vestergaard, Rannveig Hovgaard og Hjørdis Heindriksdóttir eru so ovarlaga í yvirlitinum yvir teksthøvundar á síðu 12, er tann, at tær allar hava staðið fyri at geva út lesibøkur. Tað hava teir menn, sum standa ovast í yvirlitinum, eisini.

Í nýggjari tíð frá umleið sjeytitalinum og fram eru tó fleiri kvinnur, sum skriva, og sum ikki hava fingið innivist í hesum lesibókunum; tað eru m.a. Guðrun Gaard, Rakel Helmsdal, Ebba Hentze, Oddvør Johansen, Marjun Kjelnæs og Elin Mortensen.

Tó er vert at nevna, at kvinnur hava skrivað og ritstjórnað nógv lesitilfar í føroyskum síðan mitt í sjeytiárunum.

# 6 MYNDPRÝÐINGAR

Í flestu bókum eru ein ella tveir myndprýðarar, og tá eru teir í flestu førum menn. Í bókunum Lesibók til 2. og 3. skúlaár eru tó fleiri myndprýðarar, somuleiðis eisini í seinastu lesibókini um Hervør og Høgna. Tó eru tað framvegis flest menn, ið myndprýða eisini hesar lesibøkurnar. Í talvunum, sum eru endurgivnar, havi eg bara talt myndir við, sum hava fólk sum part av myndevni; tað eru sera nógvar myndir av dýrum í føroyskum lesibókum, og tær havi eg valt frá, tí eg haldi ikki, at tær eru viðkomandi fyri hetta evnið, sum verður viðgjørt.

Kvinnur verða ikki brúktar sum myndprýðarar fyrr enn í áttatiárunum. Tá er tað serliga Astrid Andreasen, sum verður brúkt.

Um myndirnar kann sum heild sigast, at størsta talið er av dreingjum og monnum. Tó meti eg ikki, at munurin er so stórur, at tað er vert at gera nógv burtur úr tí. Myndevnini fylgja sum oftast søgunum, og tí eru tey sjálvandi innihaldsliga siðbundin.

**A.C. Evensen:** Harubókin
**Myndprýðing:** ókend

**Elsebeth Vestergaard:** Pisubókin 1
**Myndprýðing:** Jacob Olsen

**Elsebeth Vestergaard:** Pisubókin 2.
**Myndprýðing:** Oskar Hermannsen

**Jeffrei Henriksen:** Perbókin.
Lesibók við avmarkaðum orðatilfari
**Myndprýðing:** Herálvur Jacobsen

**Poul E. Petersen:** Mín fyrsta lesibók
**Myndprýðing:** Ingolv av Reyni og Heri Smith

**Enni, Henriksen, Næs, Samuelsen, Sigvardsen, á Steig:**
Lesibók til 2. skúlaár.
**Myndprýðing:**
Tróndur Patursson (28), Bárður Jákupsson (16), **Astrid Andreasen (15),** Martin Joensen (14), Heðin Kambsdal (8), Frits Johannesen (8), **Katrin Johansen (3)**

**Enni, Henriksen, Næs, Samuelsen, Sigvardsen, á Steig:**
Lesibók til 3. skúlaár. 1. partur
**Myndprýðing:**
Bárður Jákupsson (14), Zacharias Heinesen (11), Fridtjof Joensen (11), Hans J. Glerfoss (8), Frits Johannesen (7), Heðin Kambsdal (5), **Elinborg Lützen (3), Astrid Andreasen (2), Katrin Johansen (2),** William Heinsen (2), Jógvan Asbjørn Skaale (1), Jacob Olsen (1), Herluf Jensenius (1), Mogens Zieler (1)

**Enni, Henriksen, Næs, Samuelsen, Sigvardsen, á Steig:**
Lesibók til 3. skúlaár. 2. partur
**Myndprýðing:**
**Astrid Andreasen (18),** Frits Johannesen (8), Heðin Kambsdal (6), **Hjørdis Johansen (4), Anna Katrina Højgaard (4), Tove Guttesen (4), Anni A. Jacobsen (4),** Tróndur Patursson (2)

**Hjørdis Heindriksdóttir:**
Hervør og Høgni í skúla
**Myndprýðing:** Olivur við Neyst

**Rannveig Hovgaard & John Næs Berg:**
Hervør og Høgni og hini
**Myndprýðing:** Hannis Egholm, Olivur við Neyst

**Rannveig Hovgaard & John Næs Berg:**
Hervør og Høgni í triðja
**Myndprýðing:**
Janus Dam Guttesen, Hannis Egholm, **Kari Roarsdóttir, Astrid Andreasen, Bente Olesen Nystrøm,** Edward Fuglø, Gundur Mortensen

# ELDRI TILFAR

7

*A. C. Evensen: Harubókin. 4. broytta útgáva, H. N. Jacobsens Bókahandil 1963*

Harubókin er lesibók, ið byggir á fýra aðrar útgávur eftir A. C. Evensen. Tær eru:
Lesibók fyri yngri børn, 1907, Lesibók, fyrsti partur, 1929 og Lesibók fyri yngri børn, 1950.
92 tekstir eru í Harubókini, harav eru teir 67 tilfar úr hinum trimum útgávunum og 25 nýggir tekstir.

Harubókin er á torleikastigi at síggja til býtt í helvt. Fyrra helvtin hevur styttri tekstir við myndum, meðan seinna helvtin eru longri tekstir við nærum ongum myndum.

Sigrun Hjalmarsdóttir vísir á, at størri fyrilit er tikið fyri tí barnsliga í hesari lesibókini, kanska serliga av tí at ein nýggjur bólkur um ævintýr er komin við í hesari útgávuni.
Men

**"...at samleikamyndin í lesibókini ikki samsvarar so væl við gerandisdagin hjá føroyska barninum í 60- og 70-unum."**

Harubókin – myndir




**Teksthøvundar:** A. C. Evensen: 21, V. U. Hammershaimb: 13, Hans A. Djurhuus: 7, Jakob Jakobsen: 7, Mikkjal Dánjalsson á Ryggi: 5, Jóannes Patursson: 4, Absalon Jógvansson: 2, Dione Isaksen: 2, Marius Johannesen: 2, R. C. Effersøe: 2, Símun av Skarði: 2, **Anna Maria Petersen: 1,** Regin Dahl: 1, Christen Holm-Isaksen: 1, **Johanna Maria Skylv Hansen: 1,** Louis Zachariassen: 1, Victor Danielsen: 1

## Kynsleiklutir í Harubókini




**Aðrir leiklutir - kvinnur:** bindingarkona, bóndakona, bróstakona, drotning, handilskona, hoykona, kirningarkona, kópakona, nunna, seymikona, tíningarkona, tókona, vevkona
**Aðrir leiklutir - menn:** bátasmiður, biskupur, brúðmaður, djóralækni, drykkjumaður, fjallmaður, jólamaður, keypmaður, kokkur, kolmeistari, huldumaður, húskallur, lækni, norðmaður, prestur, skipsmaður, skraddari, slóttumaður, spunamaður, trælur, træsmiður, tænastumaður, valdmaður, veiðimaður, veitingarmaður, vísmaður

---

### *Samandráttur:*

Tilsamans hava konur 17 ymsar leiklutir, og menn hava 39 ymsar leiklutir. Tað er tó sera stórur munur á, hvussu ofta hesir ymsu leiklutir verða nevndir í tekstunum. Kvinnur verða nevndar kongsdøtur, fjóskonur, kellingar og trøllkonur meira enn einaferð í tekstunum, meðan 13 leiklutir hjá monnum verða nevndir meira enn einaferð.

Meðan leiklutir hjá kvinnum hava yvirvág av ævintýri og søgn, so hoyra leiklutir hjá monnum í stóran mun til trúarlív, ævintýr, arbeiði á landi, yvirstættarlív og arbeiði á sjónum.

Sostatt ber til at siga, at menn/dreingir eru við yvirlutan í tali av leiklutum so væl sum fjølbroytni í leiklutum.

Við atliti at, hvat konur takast við í søgunum, eru tað fyrst og fremst uppgávur, sum fara fram í heiminum. Tær ansa børnum, leggja tey at sova, troysta tey, tá tey eru kedd, rósa teimum, fortelja um Jesus og rættleiða børnini. Bert í tveimum førum verður sagt nakað um uppgávur, sum fara fram uttan fyri køkina/sovikamarið, nevnliga at hon er føðihjálpari hjá djórum, og at hon treskir korn.

Sinnalagið verður í flestu førum lýst sum, at hon hevur eitt ljóst sinnalag, at hon er gávumild, at hon hevur eitt gott hjarta, at hon er dugnalig og klók, í einstøkum førum verður hon skilmarkað sum tað beint øvuta: hon er øvundsjúk og ein, sum hatar gentuóvitar.

Kynsleiklutirnir hjá monnum er nógvir og fjølbroyttir, men ofta eyðkendir av, at teir hoyra til hægru statusløgini: leiklutirnir hoyra antin saman við trúgv og kongadømi, ella eru leiklutirnir skilmerktir sum verðsligar uppgávur, teir eru bøndur, røkta seyð, føra skip og útvega húskinum mat sum fiskimenn. Harafturat hava teir eisini størv, sum krevja skúlagongd, til dømis eru teir handverkarar, læknar, prestar og skraddarar.

Uppgávurnar hjá monnum eru í flestu førum uttan fyri heimið: teir fiska, reka seyð, í einstøkum førum taka teir sær av at læra børn at lesa ella lesa til dømis borðbøn, teir eiga bæði livandi og deyðar lutir, og teirra ærukærheit og strangleiki eru, øvut av konufólki, ofta eyðkendir av at vera hildnir at vera góðir eginleikar.

Har maður og kona verða søgd at gera nakað í felag, fiska tey, treskja korn, smíða skip, eiga kúgv, berjast og fara frá børnum.

Dreingja- og gentuleiklutir í søgunum eru nógv merktir av arbeiði; bæði dreingir og gentur hjálpa til í arbeiði, genturnar eru nærri húsum, meðan dreingirnir kunnu fara longri t.d. at reka seyð, fara í bjørgini og út at fiska. Dreingir spæla eisini meira enn gentur, og teir gera roysni og hava hug á gentum. ■

*Hans A. Djurhuus: Barnabókin. 7. útgáva, H. N. Jacobsens Bókahandil 1970*

Barnabókin byggir á eina útgávu frá 1927, sum í sínum lagi byggir á útgávur frá 1923 og 1924. Útgávan frá 1927 kom síðan út fimm ferðir aftrat, seinast í 1970.

Hans Andrias hevur skrivað allar tekstirnar sjálvur, og eru teir tí í mun til teir í lesibókum A. C. Evensens ikki tiknir úr antologium og eru ikki grundaðir á gamla føroyska mentan sum heild. Teir eru eisini við í seinni lesibókarøðum, nevnliga: Lesibók til 2. skúlaár (1983) og Lesibók til 3. skúlaár, fyrsti partur (1984).

Sigrun Hjalmarsdóttir vil vera við, at Hans Andrias Djurhuus umboðar eina bjartskygda barnafatan í barnaskaldskapi, og tað kann neyvan nakar mótmæla. Av tí at tekstirnir eru uppafturprentaðir í lesibókum heilt fram til 1984, hava teir havt sera stóra ávirkan á uppvaksandi ættarlið av børnum stóran part av 20. øld.

Ongar myndir eru í Barnabókini, hon hevur eisini á fólkamunni verið kallað Perbókin.




**Aðrir leiklutir - kvinnur:** bóndakona, dadda, køkshjálp, matmóðir, neytakona, prestafrúa, purka
**Aðrir leiklutir - menn:** amtmaður, andøvsmaður, bakari, bjargamaður, bispur, huldumaður, jallur, keisari, lækni, lærari, ráðharri, ránsmaður, rossadrongur, seyðatjóvur, sýslumaður, skipari, tænari

## Kynsleiklutir í Barnabókini (H.A. Djurhuus). Átta útgávur 1923-1970

### *Samandráttur:*

Tilsamans hava konur 8 ymsar leiklutir, meðan menn hava 26 ymsar leiklutir. Bert ein leiklutur hjá konum verður nevndur meira enn einaferð, tað er kongsdóttirin, meðan 9 leiklutir hjá monnum verða nevndir meira enn eina ferð. Flestu leiklutir hjá monnum hoyra enn fyrst og fremst til trúarlív, ævintýr, landbúnað, kríggj og handil.

Leikluturin hjá kvinnuni er enn, sum hjá A.C. Evensen, í størstan mun at taka sær av heiminum og børnunum. Tó eigur at verða lagt til merkis, at leiklutirnir eru fjølbroyttari. Hon traðkar meira fram úr tekstunum so at siga: vit fáa at vita, at hon ger eitt arbeiði, áðrenn tað, sum kann etast, kemur í køkina. Hon mjólkar, roytir fugl og treskir korn, og hon verður lýst sum ein persónur við fjølbroyttum eginleikum. Viðurskifti við mannin koma fram í tekstunum, og dentur verður lagdur á, at hon hevur alsknar kenslur fyri manninum eins og óalsknar. Í tveimum førum verður hon enntá lýst at vera sera sjálvstøðug: hon ferðast til Keypmannahavnar, og hon keypir eitt bakarí. Ferðina til Keypmannahavnar verður hon seinni lastað fyri, hon verður lýst sum fín uppá tað, hevur gloymt sítt egna móðurmál, men hon fær sína revsing við at fáa eina rívu í høvdið, soleiðis at lesarin sleppur at flenna at hennara tápuligheit.

Ein klassisk søga er tann um gomlu konuna Marin Katrinu, sum verður sera firtin ein dagin,

hon kemur inn til keypmannin og varnast, at hann hevur skrivað á veggin: Her slænges Maren Katrine. Tað vísir seg so, at gamla er antin blind, býtt ella dugir illa at lesa, tí sjálvandi stendur: Her sælges Margarine. Kvinnan, sum keypir bakaríið, verður tó ikki hildin fyri gjøldur, og tað er í sjálvum sær merkisvert, bæði tað, at kvinnur kunnu ráða yvir pengum, og at tær kunnu skapa sær sína egnu tilveru.

Leiklutirnir hjá monnum í hesi bókini eru í grundini teir somu sum hjá A.C. Evensen. Teir eru enn fyrst og fremst kongar og bøndur. Tað kemur eisini týðiliga til sjóndar, at maðurin er ognarmaður, hann eigur fastar ognir, sum hús, neyst og bát umframt djór. Tó haldi eg, at H.A. Djurhuus hevur givið manninum meira samband við børn, enn vanligt hevur verið fyrr, eins og hann hevur lagt dent á aðrar eginleikar við manninum umframt teir vanligu mannligu, sum eru at vera sterkur og erpin. Maðurin fær eisini fleiri kensluligar og musiskar eginleikar: hann yrkir, hann hjálpir konuni við barnsburði, og hann er enntá forelskaður.

Annars hava menn og konur tað til felags, at tey arbeiða í fiski á landi.

Viðvíkjandi drongi og gentu er drongurin framvegis ein, sum fyrst og fremst hjálpir til í arbeiði, serliga uttandura og burtur frá húsum, meðan gentan her er blivin enn passivari, hon spælir nógv við dukkur og kettlingar, hentar blómur og hevur annars fingið ein ógvuliga friðarligan leiklut í mun til drongin. ■

*Elsebeth Vestergaard: Pisubókin 1 (1958 & 1962 & 1967)*
**Pisubókin 1 – Myndir**
**Tekningar:** Jacob Olsen

Bert ein mynd er av fólki í hesari bókini, tað er ein av gentu við dukku, hinar eru
Djór (18), Útimyndir (11), Ymsir lutir (8), Likamslutir (4), Sól (3), Dukka (3), Verur (3), Rósa (2), Jólatræ (2), Matur (2)

*Elisabeth Vestergaard: Pisubókin 2 (1962 & 1963).*
**Pisubókin 2 – Myndir**
**Tekningar:** Oskar Hermannsen

Pisubókin 2 – myndir



## Kynsleiklutir í Pisubókini 1-2

*Samandráttur:*

**Kona:** tekur sær av børnum (6), lúkar (2), kykar (2), ger mat (3), sigur søgu, er fín, málar, eigur urtagarð, karðar, rakar, hjálpir dýri, ger dukkuklæði

**Maður:** eigur ognir og dýr (5), rekur seyð (3), tettir leka, seymar, setir nót, laðar varða, skjýtur harur, ríður, lærir drong arbeiði, ger lutir úr sevi, gevur drongi pisu, fer í hagan, bjargar gás, ger gentu dukkuhús

**Drongur:** ríður á rossi (2), fer í hagan, fiskar, eigur bátar, fær kikara, er móður

**Genta:** spælir við dukku (4), seymar, sólar sær, fangar síl, vaðar, sigur søgur, lúkar, klintrar upp á tak, fóðrar seyð, fer í hagan, ger mat.

Í 1958 og 1963 koma tvær lesibøkur frá eini kvinnu, Elsebeth Vestergaard, og fyri fyrstu ferð sæst ein broyting í kynsleiklutunum frá teimum meira praktisku uppgávunum sum at gera mat, vaska, ansa børnum yvir til tær lættaru uppgávurnar, sum enn eru siðbundið femininar, men heilt øðrvísi í mun til slag av arbeiði.

Í bókunum verður stórur dentur lagdur á samanspælið millum móður og dóttur, og harafturat hevur arbeiðið eitt slag av frítíðarítrivi yvir sær, so sum urtagarðsarbeiði, máling, gera dukkuklæðir, siga søgur og so framvegis. Fyri fyrstu og einastu ferð verða konur umrøddar sum jarðarmøður.

Tað sama er hent við uppgávunum hjá manninum, hann ansar enn seyði og fiskar, men lesibókarithøvundurin leggur stóran dent á at lýsa tær meira femininu síðurnar av manninum, sum samkenslu og umsorgan. Harafturat fær hann nú handverkskendar eginleikar. ■

*Jeffrei Henriksen: Perbók. Lesibók við avmarkaðum orðatilfari 2004*
**Tekningar:** Herálvur Jacobsen

Byggir á útgávur frá 1958 og 1973.

Teksturin er bygdur upp, soleiðis at orð og setningar verða endurtikin upp í saman.

Her skulu endurgevast nakrir av setningunum í bókini. Talan er um setningar, sum av námsfrøðiligum orsøkum koma fyri umaftur og umaftur:

**- menninir fara á fjall**

**- menninir skera torv**

**- Per sker torv**

**- menninir koma í land frá skipi**

**- teir eru á fjalli**

**- teir fóru á fjall**

**- teir róku lombini í rætt**

**- nú hevur hvør maður nógv at gera**

**- um eina viku fara menninir at sláa**

**- í morgin fer pápi at skera torv**

**- men pápi hevur meira at gera enn vit hava**

**- í dag fekk hann ikki eina løtu at hvíla seg í**

**- nú fer ein maður at sláa**

**- pápi fer burtur í haga í morgin**

**- Per fer burtur í haga**

**- Per fór at bera torv**

Tekningarnar mugu sigast at vera sera neutralar í mun til innihaldið í lesibókini. Í flestu førum samsvara tær als ikki við innihaldið.

## Perbók – myndir

| GENTA | DRONGUR | DJÓR | ANNAÐ |
|---|---|---|---|
| genta/ketta | drongur | ketta | bátur |
| genta/diddl | drongur | veðrur | skip |
| genta skrivar | drongur | hundur | bátur |
| genta etur | drongur | hundur | |
| genta/hundur | drongur etur | ketta | |
| genta | drongur | gæs | |
| genta | | ross | |
| | | ross | |
| | | hundur | |
| | | hundur | |

Gentur verða als ikki umtalaðar í tekstinum, men eru væl umboðaðar í myndum. Eisini tykjast myndirnar av gentunum í mun til dreingjamyndirnar at vera meira aktivar, ella rættari tær siga nakað um gentuna, har dreingjamyndirnar eru fullkomuliga neutralar.

Onkursvegna tykjast myndirnar at vera eitt slag av kompensatión fyri, at teksturin er so kallmansligur.

Bókin er 108 blaðsíður, á síðu 101 stendur:
*Mamma er inni. Hon hevur nógv at gera. Tað er ikki meir enn hon fær eina løtu til at seta seg niður at hvíla í. Eg veit væl, at tá ið vit fara niður um kvøldið, hevur hon nógv eftir at gera.*

Hetta er einastu ferð, at eitt kvennkyn kemur fyri í tekstinum, annars er teksturin, allur sum hann er, um menn, dreingir, bátar, rakstur, torv og sláttur.

Samanumtikið má sigast, at tað er ein gáta, at ein bók við so eyðsýndum kallmansligum innihaldi verður útgivin í 2004. ■

*Poul E. Petersen: Mín fyrsta lesibók, Helgi Justinussen Bókahandil 1967*

**Tekningar:** Ingolv av Reyni og Heri Smith

## Mín fyrsta lesibók – myndir




Lesibókin er gjørd við didaktiskum endamáli: at læra børn at lesa. Bókin er ætlað til byrjanar-undirvísing.

Hon skilir seg í so máta tí fullkomiliga frá lesibókunum hjá Evensen og Djurhuus, við tað at tað listarliga ella mentanarliga ikki er høvuðsmálið við hesari bók.

Í fororðinum sigur høvundurin:

**“Tann gamli royndi mátin er stavingarhátturin, men seinni eru menn farnir at brúka orðbílætaháttin og ljóðháttin aftrat, og vilja teir vera við, at besta úrslitið fæst, tá ið allir tríggir hættirnir verða nýttir saman…”**

Seinast í fororðinum takkar høvundurin tó bæði lærarum og lærarinnum fyri hjálpina at gera bókina.

Høvuðsorðini eru flest kvennkynsorð:
**Kvennkyn:** Ása, il, Elsa, nál, á, mamma, gás, omma, hond, dunna, kona, dukka, hurð, æða, øða, mús, kúgv, ketta, høna

**Kallkyn:** Óli, bátur, ísur, fótur, abbi, pápi, úlvur, hylur, hjallur, bóltur, hundur, veðrur, hani

**Hvørkikyn:** lás, ross, ur, jólatræ, oyra, eyga

Bókin er útgivin á fyrsta sinni í 1967 og er sera heilskapað.

Hon er um tvær familjur, foreldrini hjá Ásu og Óla og mostur og gubba Ásu og Óla.

Tað er týðiligt, at í báðum familjunum fáa bæði kynini eins nógva umrøðu, og at leiklutirnir hjá báðum kynum verða mettir at hava eins virði.

Bókin endurspeglar sína tíð, har konur vóru heima og gjørdu mat og tóku lut í útiarbeiði sum t.d. hoygging og torvskurði. Leiklutirnir hjá kynunum vóru fastir, men hóast tað verða teir í hesari bókini mettir at hava eins nógv virði. Hetta er eitt eyðkenni fyri hesa bókina í mun til nýggjari bøkur sum t.d. Hervør og Høgna og hini (Hovgaard/Berg), har leiklutir hjá mammuni/konuni eru horvnir. Til dømis verður virksemi sum hagreiðing av seyði, fiski og øðrum als ikki umrøtt í teirri bókini.

Mín fyrsta lesibók er bygd upp soleiðis, at helvtin av bókini eru stuttir setningar, so børnini skulu læra teir einstøku bókstavirnar og smáar setningar. Síðani koma smærri søgur um gerandisdagin hjá børnunum.

Fyrra helvt av bókini vísir týðiliga, at rithøvundurin roynir at býta sól og vind líka. Tað, sum verður sagt um Ásu, verður eisini sagt um Óla.

**Dømi:**

**Ása sá bát – Óli sá bil**

**Ása fer í ein bil – Óli fer í ein bil**

**Dømi:**

**Í dag vóru vit í torvi. Pápi skar torv, mamma, Ása, Óli og eg bóru burtur. Vit høvdu eisini eld. Vit kókaðu okkum drekka. Tá ið vit høvdu breitt alt torvið, fóru Ása, Óli og eg at fanga síl. Eg fekk 3 síl, Ása fekk 5, og Óli 10.**

Tað er rættiliga týðiligt, at mamman og mostirin verða settar javnt við pápan og gubban. Tað merkir, at reglurnar eru teir siðbundnu, føstu leiklutirnir fyri kvinnur og menn, men í bókini verður sera stórur dentur lagdur á felagsskap. Ein boðskapur tykist vera, at um tú skalt klára at ansa jørð og djórum, er tað sera neyðugt, at maður og kona gera uppgávurnar í felag, annars ber ikki til at gera tær.

**Dømi:**

**hjallur**
**vit eiga ein stóran hjall,**
**vit heingja kjøt og fisk í hann,**
**mamma gevur okkum kjøt og breyð,**
**og tað dámar okkum væl,**
**pápi sigur eisini,**
**at vit verða so røsk,**
**tá ið vit eta kjøt og breyð,**
**tað er gott at eiga kjøt í hjalli.**

**Dømi:**

**Lisa mostir**

**Mostir mín eitur Lisa. Hon er gift við gubba mínum. Hann eitur Per. Lisa mostir og Per gubbi eiga nógvan seyð, 5 kýr, 2 ross, nógvar gæs, nógvar hønur og nógvar dunnur. So eiga tey eisini eina kettu, ein kálv og ein stóran tarv.** ■

*Samandráttur:*

# KYNSLEIKLUTIR 1907-1967

## Kynsleiklutir/kvinnur 1907-1967




**Aðrir leiklutir - kvinnur**
Bindingarkona, bróstakona, dadda, drotning, handilskona, hoykona, kirningarkona, kópakona, køkshjálp, neytakona, nunna, prestafrúa, purka, seymikona, tíningarkona, tókona, vevkona

## Kynsleiklutir/menn 1907-1967




**Aðrir leiklutir - menn**
Skipari (3), eingil (2), fiskimaður (2), herhøvdingi (2), huldumaður (2), lækni (2), lærari (2), smiður (2), tænari (2), øskudólgur (2), amtmaður, andøvsmaður, bakari, bátasmiður, biskupur, bispur, brúðmaður, djóralækni, drykkjumaður, fjallmaður, húskallur, jallur, jólamaður, keisari, kokkur, kolmeistari, ráðharri, rossadrongur, seyðatjóvur, sjómaður, skipsreiðari, skraddari, sláttumaður, snikkari, spunamaður, sýslumaður, trælur, valdmaður, veiðimaður, veltingarmaður, vísmaður

Fyri at draga samanum meini eg, at søgur úr hesi tíðini eru týðiliga moralskar, tað vil siga, at vit fáa beinleiðis/óbeinleiðis at vita, hvussu ein rættilig mamma og ein rættiligur pápi fara við børnum sínum. Onkursvegna er tað eitt sett av livireglum í hesum søgum.

Fedrar og synir eru ein eind. Tað er øgiliga týdningarmikið fyri pápan at læra synir sínar at arbeiða og skaffa mat til familjuna við at fiska, reka seyð, síga í bjørgunum og so framvegis. Eisini eru hampiliga nógvar søgur um justits millum dreingir í spæli og arbeiði, og stórur dentur verður lagdur á rættvísi og gávumildheit, at tú skalt hugsa um, at ikki øll eru líka heppin í spæli, og at tað at vera gávumildur lønar seg at enda.

Størsta uppgávan hjá pápanum er at skaffa mat til familjuna, og tí er tað ein ómetaligur ósigur, um hann ikki klárar hesa uppgávu. Í søguni ”Dulurin” fær maðurin enntá hjálp frá einum huldumanni, sum vísir honum bestu miðini, og mann fiskar gjarna í bátum, sum huldumenn eiga. Í søguni ”Risans klóta” er pápin so óheppin, at hann bara eigur tríggjar døtur og tí má gera alt arbeiðið sjálvur. Hann lovar tískil døtur sínar burtur til ein risa fyri at fáa reiðskap, sum sjálvur kann gera arbeiðið. Hetta kann assosierast við neyðina í menningarlondum, har foreldur noyðast at lata døtur sínar vinna til føðina, antin við at gerast trælaarbeiðarar ella við at selja kroppar sínar til eldri menn (risar).

Møður og døtur eru ein eind, tó við størri denti á døtur. Møður og synir eru ein samansetting, sum er natúrlig, tá synirnir eru smáir og skulu leggjast at sova ella troystast. Tá synirnir gerast eldri, gerst mamman eitt slag av áskoðara, ið rósar soni sínum fyri vælgjørt arbeiði og kallar hann ein raskan drong. Mammur hava meira til felags við døtur sínar, tær vegleiða tær og troysta tær, tá tær eru keddar, ofta tí tær hava verið í tvídrátti við vinkonur sínar. Samanumtikið er meira friður yvir hesum søgum enn í søgunum við dreingjum, sum meira ferð er á.

Søgnin um Kópakonuna er ein sera sigandi søga um, at mammur elska síni børn, eisini tá tær noyðast at fara frá teimum. Beint øvugt hesum slagi av mammu er fosturmamman. Henda mamman hatar fosturdóttur sína yvir alt. Hon er til reiðar at drepa hana, letur hana arbeiða, til hon smellur um og letur hana á allar mátar vita, at hon er tað ringasta, sum yvirhøvur er til. Ofta er tað, tí at fosturmamman sjálv hevur fingið eina dóttur við manni sínum. Í lesibókini hjá Evensen frá 1908 eru trý long ævintýr við hesum slagi av mammu; Snjóhvíta, Krákudóttir og Kalsdóttir og Gentan, sum fekk mat og klæðir í heygnum.

Leiklutir og sinnalag hjá gentum og dreingjum eru lýst sera siðbundið: gentum dámar væl friðarligar uppgávur, sum dukkur og kettlingar.

Í flestu førum eru dreingir lýstir sum ein lítil útgáva av pápunum: teir gera eina rúgvu av arbeiði uttandura og hjálpa mammum og ommum við at skaffa torv til húsa og fiska og so framvegis, helst tí pápin ikki er til staðar. Hann er úti og fiskar, sjálvt um hann í flestu førum er lýstur sum kongur ella bóndi í lesibókum.

Familjan verður merkisvert lítið lýst sum ein familja, har pápin er til skips. Fiskiskapur verður aloftast lýstur sum heimaútróður, tvs. páparnir koma altíð aftur eftir stutta tíð. Idealið tykist at vera bóndin, møguliga ein, ið eisini eigur útróðrarbát.

Um vit samanbera lesibøkurnar hjá Evensen og Djurhuus við lesibøkurnar, sum Elsebeth Vestergaard hevur skrivað, so er tað rættiliga týðiligt, at tað er ein kona, sum hevur skrivað hesar lesibøkur. Størri dentur verður lagdur á friðarligu uppgávurnar, frítíðaráhugamál og so framvegis. Hon er ikki so upptikin av at brúka tíð uppá at lýsa manndómsroyndir og sovorðið.

Hon hevur skrivað tvær lesibøkur, har tað í fyrru bókini týðiliga sæst, at myndavalið hevur eitt sera feminint innihald.

Í fyrru bókini er býtið av myndum av grammatiskum kyni:

**33 kvennkynsorð**
**12 hvørkikynsorð**
**11 kallkynsorð**

Í seinnu bókini er umleið helvtin av teimum 30 myndunum av dreingjum og vaksnum monnum.

Munurin kemst fyrst og fremst av, at í fyrru

bókini verður dentur lagdur á fyrstu lesiinnlæring, og at tað ikki eru nógvar samanhangandi søgur, men mest styttri søgur, ið verða endurtiknar.

Í seinnu bókini, ið er gjørd til børn, ið eru komin longur í lesiinnlæringini, gerast søgurnar meira samanhangandi, og harafturat er bókin gjørd soleiðis, at hon lýsir eina samanhangandi gongd, ið snýr seg um trý børn, tveir dreingir og eina gentu, sum skulu vitja pápabeiggja sín. Lýsingarnar av pápabeiggjanum og serliga abbanum saman við børnunum er gjørd soleiðis, at femininu síðurnar hjá monnum koma sera týðiliga fram. Teir vísa umsorgan og gleði við at vera saman við børnum á barnsins egnu premissum. Og tað er heilt nýtt í føroyskum lesibókum.

Í bókini hjá Poul E. Petersen er teksturin grundaður á eina fatan av heimalívi, har øll hjálpast at við arbeiði. Tó er matgerð og annað innandura virksemi, sum mamman/konan tekur sær av, undantikið. Týðiligt er, at matur hevur stóran týdning, og tí hevur luturin hjá konum stóran týdning í hesari bókini. Annars luttaka øll í hoygging og torvarbeiði. So rætt er at siga, at felagsskapur er millum vaksin og børn, mann og konu, systur og bróður.

Samanumtikið kann sigast, at tekstirnir í høvuðsheitum lýsa familjulív, har øll geva sítt íkast til uttanduraarbeiði. Innandura í køkini hevur mamman tó sítt fasta pláss. Børn eru smáar støddir, sum vaksin skulu forma, sum tey vilja hava tey. Og leiklutirnir og upplivingarnar hjá monnum eru munandi fleiri enn hjá kvinnum.

Í dag vóru vit í torvi. Pápi skar torv, mamma, Ása, Óli og eg bóru burtur. Vit høvdu eisini eld. Vit kókaðu okkum drekka. Tá ið vit høvdu breitt alt torvið, fóru Ása, Óli og eg at fanga síl. Eg fekk 3 síl, Ása fekk 5, og Óli 10.

33 kvennkynsorð
12 hvørkikynsorð
11 kallkynsorð

Hann, ið eigur nógva ull
og nógv kjøt, er væl farin,
tí ullin er góð til klæðir,
kjøtið er gott til viðskera.

hjallur
vit eiga ein stóran hjall,
vit heingja kjøt og fisk í hann,
mamma gevur okkum kjøt og breyð,
og tað dámar okkum væl,
pápi sigur eisini,
at vit verða so røsk,
tá ið vit eta kjøt og breyð,
tað er gott at eiga kjøt í hjalli.

Vit spæla saman
So skeldast vit
So gráta vit
So blíva vit kedd
So tosa vit saman

Vilt tú vera ríkur, skalt tú gomlu trettandu nátt…

"Kann eg fáa breyð við osti?" sigur Høgni.
"Ja, ja, Høgni," sigur pápi.
"Kann eg fáa ís?" sigur Hervør.
"Nei, nei, ikki til morgunmat," sigur mamma.
"Kann eg fáa kola?" sigur Høgni.
"Nei, nei, ikki til morgunmat," sigur pápi.

# 8 YNGRI TILFAR

*Enni, Henriksen, Næs, Samuelsen, Sigvardsen, á Steig:*
*Lesibók til 2.skúlaár. Føroya Skúlabókagrunnur, 1981-1984*

**Styttingar:**
V+B= vaksin og børn
M+B= maður og børn
K+B= kona og børn
K+G = kona og genta
M+D = maður og drongur
M+G = maður og genta

## Lesibók 2 – Myndir




## Lesibók 3, 1-2 partur - Myndir



## Lesibók til 2. skúlaár – tekstir

Hans. A. Djurhuus: 53, Børn í Vestmanna: 11, M. Johannesen: 8, A.C. Evensen: 5, Jeffrei Henriksen: 5, J.Enni/N.Thomsen: 1, F. Flekk: 1, Jákup Hansen: 1, Chr. Høj: 1, C. Holm Iskasen: 1, Djóni Isaksen: 1, Johan Kallsoy: 1, Johs. Andr. Næs: 1, J. Sigsgård: 1, Louis Zachariasen: 1, M. Moberg: 1, **Phyllis Flowerdew: 1, Mia Hallesby: 1**

## Lesibók til 3. skúlaár, fyrsti partur – tekstir

Hans A. Djurhuus: 38, A. C. Evensen: 4, Alexandur Kristiansen: 3, Jakob Jakobsen: 3, Marius Johannesen: 3, Halfdan Rasmussen: 2, Jacob Hansen: 1, Peter Jakob Sigvardsen: 1, Djóni Isaksen: 1, Grimm: 1, R. C. Effersøe: 1, Alex Garff: 1, Sjúrður Joensen: 1, **Lina Sandell: 1, Karin Samuelsen: 1,** Steingrímur Weihe: 1, Lennart Hellsing: 1, **M. Heinesen: 1,** Steingrím Niclasen: 1, Sverre Egholm: 1, Mourits Mohr: 1, **Marita Dalsgaard: 1, Hjørdis Johansen: 1, Anna Maria Petersen: 1**

## Lesibók til 3. skúlaár, annar partur – tekstir

Hans A. Djurhuus: 19, Marius Johannesen: 4, Mikkjal D. á Ryggi: 4, A. C. Evensen: 3, Grimm: 3, V. U. Hammershaimb: 3, Flóvin Flekk: 2, Jóannes Patursson: 2, Oskar Hermannsson: 2, Jeffrei Henriksen: 1, Jacob Olsen: 1, Absalon Jógvansson: 1, Finnbogi Isaksen: 1, Heðin Brú: 1, **Eva Forss: 1,** Sigurð Joensen: 1, Jákup M. Kjeld: 1, P. J. Sigvardsen: 1, Andreas Andreasen: 1, **Jóhanna M. Skylv Hansen: 1, Kirsten Pendrup: 1,** Sverri Egholm: 1, Olivar á Ryggi: 1, Alexandur Kristiansen: 1, Steingrím Niclasen: 1, N. F. S. Grundtvig: 1, Leo Tolstoj: 1, Morten Børup: 1, **Lucy Sprague Mitchell: 1,** Sámal Johansen: 1, **Sofía Petersen: 1,** Sverre Patursson: 1, Hans Dalsgaard: 1, Steinbjørn B. Jacobsen: 1, Johs. Andr. Næs: 1

## Kynsleiklutir Lesibók 2-3




**Aðrir leiklutir – kvinnur**

Arbeiðskona, grýla, handilskona, huldukona, jomfrú, keisari, kongur, kelling, matmóðir, neytakona, prestafrúa

**Aðrir leiklutir – menn**

Jólamaður (2), veiðimaður (2), kongur (2), próstur (2), ráðharri (2), skipari (2), tænari (2), trælur (2), andøvsmaður, øskudólgur, bakari, forfaðir, seyðatjóvur, greivi, hertugi, hovmaður, herhøvdingi, jallur, keisari, kongabarn, listamálari, risi, løgtingsmaður, lækni, valdmaður, myllari, postboð, riddari, rossadrongur, ránsmaður, skraddari, smiður, hermaður, spælimaður, njósnari, stýrimaður, sýslumaður, tannlækni, vaktarmaður, vísmaður

## Kynsleiklutir
## í Lesibók til 2. og 3. skúlaár


### *Samandráttur:*

Nógv ár skuldu líða, áðrenn nýggjar lesibøkur vórðu útgivnar til annan og triðja flokk, men so komu tær í byrjanini av 80-unum.

Tað kann staðfestast, at hesar bøkur, sum verða útgivnar millum 1981 og 84, eru tær fyrstu rættiligu tekstbøkurnar síðan Evensen og Djurhuus, og at tær í grundini endurnýta gamlar tekstir, serliga hjá H. A. Djurhuus. So tað vildi verið skeivt at sagt, at bøkurnar spegla føroyska samfelagið, sum tað var í 70-unum/80-unum. Heldur eru tær eitt ekkó frá gamlari tíð, kanska eitt slag av ynski um at varðveita góðar, gamlar dagar og søgur. Enn einaferð er tað ikki tað pedagogiska, sum dentur verður lagdur á, men heldur at flyta fram eitt gamalt ideal um eitt samfelag í harmoni.

Tað er áhugavert at vita sær, at áðrenn hesar bøkurnar eru gjørdar, er farin fram ovurstór menning í verðini, bæði politiskt og sosialt. Einki av hesum verður endurspeglað í bókunum. T.d. kann bara nevnast studentauppreisturin, Vietnamkríggið, mótmæli ímóti kjarnorku, kvinnustríð, Black power rørslan, samanumtikið øll anti-autoritera rørslan, sum fekk sera stóra ávirkan á fólkalív um allan heim. Sjálvandi skulu bøkur á hesum aldursstignum ikki endurgeva slíkar hendingar, men tað er løgið at hugsa sær, at als onki er smittað av á huglagið í tekstunum.

Í staðin merkist týðiliga ein øgiliga maskulinur dámur yvir tekstunum. Bara við at samanbera søgurnar um gentur og dreingir er tað rættiliga týðiligt, at søgurnar í allarflestu førum snúgva seg um dreingir og siðbundar uppgávur hjá dreingjum í einum samfelag úr gamlari tíð. Tað er sjálvandi rætt, at nógv av teimum tingunum, sum dreingir hava gjørt í 20-unum, hava teir helst eisini gjørt í 80-unum, men eg havi ilt við at síggja, at hesir tekstir kunnu vera nakað, sum børn hava kunnað identifiserað seg við. Tó eru fleiri søgur um dreingir, ið fiska. Kanska ein byrjandi viðurkenning av, at fiskiskapur er høvuðsvinnan í Føroyum og hevur verið tað í nógv ár, sjálvt um idealið framvegis er bøndur, kongar og hirðar.

Tað er sera greiður skilnaður millum gentu og drong í hesum bókunum. Havast má eisini í huga, at nógvar av søgunum ikki eru nýggjar, men eru endurprent av eldri søgum.

Dreingjaspæl er fyrst og fremst at standa á seiðabergi, fiska, spæla við bát, smíða bát og fara á fjall.

Hann fer ørindi fyri mammuna og eisini eftir torvi. Hann eigur ofta dýr, serliga hundar og fugl.

Drongurin verður mangan lýstur sum djarvur, sum ein rættur maður, góður við djór, glaður, hjálpsamur, men eisini ein, sum grætur og er øvundsjúkur.

Gentan spælir fyrst og fremst við dukkur, ger dukkuklæðir og sóljukransar. Hon fiskar eisini onkuntíð og svimur, mjólkar neytum og verður gift.

Gentan verður sum oftast lýst sera positivt og kanska meira einstáttað enn drongurin, hon er glað, stuttlig, vøkur, bláoygd og blíð.

Menn verða lýstir sum sera útfarandi og aktivir í bø og haga og á floti.

Konur takast stórt sæð mest við at gera mat og leggja børn at sova.

Tilsamans hava konur 3 ymsar leiklutir, meðan menn hava 18 ymsar leiklutir, ið koma fyri meira enn eina ferð. Sum sæst á talvuni eru leiklutirnir hjá konum enn úr ævintýrum, meðan menn nú hava fingið leiklutir, sum hava samband við arbeiði í landbúnaði, teir eru fyrst og fremst bøndur, seyðamenn og bakkamenn, men haraftrat eru leiklutir úr ævintýri. Her verða leiklutir, sum hava samband við trúarlív, færri enn fyrr hevur verið vanligt í lesibókum.

# HERVØR OG HØGNI

9

**Styttingar:**
K+B= kona og børn
K+D= kona og drongur
M+B= maður og børn
M+D = maður og drongur
M+G = maður og genta

**Hervør og Høgni í skúla – Myndir**
**Myndprýðing:** Olivur við Neyst

Hervør og Høgni 1




**Hervør og Høgni og hini – Myndir**
**Myndprýðing:** Hannis Egholm, Olivur við Neyst

Hervør og Høgni 2



**Hervør og Høgni í triðja – Myndir**
**Myndir:** Janus Dam Guttesen, Hannis Egholm, **Kari Roarsdóttir, Astrid Andreasen, Bente Olesen Nystrøm**, Edward Fuglø, Gundur Mortensen

Hervør og Høgni 3




*Tekstir:*
Hjørdis Heindriksdóttir: Hervør og Høgni í skúla, 2001
Lesibókin er fyrst og fremst eyðkend av, at kynini eru javnmett. Orðamongdin er ikki stór, og har eru nógvar uppafturtøkur.

**Dømi:**
**Vit spæla saman.**
**So klandrast vit.**
**So gráta vit.**
**So vera vit kedd.**
**So tosa vit saman.**
**So verða vit góð aftur.**

Tað er eisini týðiligt, at pápin er meira við í gerandisdegnum hjá børnunum. Hann er ikki so nógv sum í eldri lesibókum ein, ið er burturi allan dagin: til útróðrar ella á fjalli.

**Dømi:**
**"Kann eg fáa breyð við osti?" sigur Høgni.**
**"Ja, ja, Høgni," sigur pápi.**
**"Kann eg fáa ís?" sigur Hervør.**
**"Nei, nei, ikki til morgunmat," sigur mamma.**
**"Kann eg fáa kola?" sigur Høgni.**
**"Nei, nei, ikki til morgunmat," sigur pápi.**

Tað verður sjáldan nevnt nakar ávísur leiklutur í bókini, fólk verða í stóran mun lýst við grundarlagi í tí, tey gera, og ikki hvat tey eru, so at siga. Tó er ein lærari, Øssur, við í søguni og ein lærarinna, Æsa.

## Rannveig Hovgaard og John Næs Berg: Hervør og Høgni og hini, 2004

**Umframt lesibókarithøvundarnar hava hesi skrivað tekstirnar:**
Alexandur Kristiansen (6), Óðin Ódn (4), Hans A. Djurhuus (3), Martin Joensen, Flóvin Flekk, Djóni í Geil, Oskar Hermansson, **Mirjam Nattestad**

Í hesari lesibókini hava konur tilsamans 9 ymsar leiklutir og menn hava 13 ymsar leiklutir. Tveir av leiklutunum hjá konum verða nevndir meira enn eina ferð, nevnliga lærarinnan og grýlan. Annars er at siga, at kvinnuleiklutir hava lægri status enn teir hjá monnum. Seks av leiklutunum hjá monnum verða nevndir meira enn eina ferð; tað, sum eyðkennir teir, er í grundini, at teir eru ógvuliga siðbundnir og hoyra ikki til nútímans lív.

**Leiklutir:**
**Kona:** lærarinna (3), grýla (2), heks, arbeiðskona, kokkur, arbeiðir á posthúsi, arbeiðir í frítíðarskúla, drotning, trøllagenta

**Maður:** kongur (6), bóndi (3), keisari (2), lærari (2), seyðamaður (2), vísmaður (2), trøll, risi, teldusølumaður, skipari, eingil, kattakongur, gandakallur.

## Rannveig Hovgaard og John Næs Berg: Hervør og Høgni í triðja, 2008

**Umframt lesibókarithøvundarnar hava hesi skrivað tekstirnar:**
Steintór Rasmussen (3), Alexandur Kristiansen (2), Alf Prøysen (2), Óðin Ódn (2), Leonard Lipton, **Ebba Munk Petersen**, Poul Arne Joensen, Oskar Hermansson, Samson Højgaard, N.F.S.Grundtvig, Hans A. Djurhuus, V.U.Hammershaimb, Hans-Henrik Ley, **Hervør Eyðinsdóttir, Gunnvá Niclasen, Thurid Olsen**

Í hesari lesibókini hava konur 13 ymsar leiklutir, og menn hava 26 ymsar leiklutir. Tað, sum eyðkennir kvinnuleiklutirnar í mun til mannfólkaleiklutirnar í hesari lesibókini, er, at hon aftur hevur fingið fleiri leiklutir úr ævintýrum, og at teir annars hava lágan status, meðan menn nú hava fingið leiklutir, sum hoyra nútímans gerandislívi til og hava sera høgan status.

**Leiklutir:**
**Kona:** huldukona (2), drotning, einkja, heimahjálp, kelling, kongsdóttir, læraraskúlanæmingur, lærarinna, posthúshjálpari, sunnudagsskúlalærari, tannlæknahjálp, teknmálstolkur, trúboðari

**Maður:** lækni (3), bóndi (2), djóralækni (2), kongur (2), lærari (2), prestur (2), sjómaður (2), tannlækni (2), bjargamaður, fangavørður, fimleikavenjari, forseti, kongssonur, koyrilærari, huldumaður, politistur, postboð, sunnudagsskúlalærari, skipari, skúlastjóri, smiður, teldusølumaður, tónleikari, trúboðari, vísindamaður, vísmaður

Samanumtikið eru lesibøkurnar til 2. og 3. flokk siðbundnari enn lesibókin til fyrsta flokk. Orðamongdin er vaksandi, og tekstirnir gerast rættiligar søgur heldur enn uppafturtøkur av setningum. Javnvirði millum kynini minkar, og evnini, ið verða viðgjørd, gerast fleiri.

Tað ber til at siga, at útgangsstøðið letur upp fyri javnvág, av tí at børnini Hervør og Høgni eru tvíburar, men fjølbroytni í gerandisdegnum minkar, so hvørt sum søgurnar gerast longri.

Kynsleiklutir Hervør og Høgni 1,2,3




## Hervør og Høgni 1-3

### *Samandráttur av øllum trimum bókum:*

Umframt teir leiklutir, sum eru endurgivnir í sjálvari talvuni, eru hesir aftrat:

**Kona:** grýla (2), huldukona, sunnudagsskúlalærari, tannlæknahjálp, heks, arbeiðskona, teknmálstulkur, trúboðari, læraraskúlanæmingur, kelling, kongsdóttir, trøllagenta, frítíðarheimshjálpari, kokkur.

**Maður:** keisari (2), prestur (2), skipari (2), bjargamaður, eingil, fimleikavenjari, forseti, gandakallur, huldumaður, kattakongur, kongssonur, koyrilærari, politistur, postboð, risi, skúlastjóri, smiður, sunnudagsskúlalærari, trúboðari, trøll, vísindamaður.

Um vit hyggja nærri at, hvat fólk takast við í frítíðini, hvønn familjuleiklut og hvørjar eginleikar tey hava, sær tað soleiðis út:

## Frítíð

Her er munur á gentu og drongi, við tað at drongur sparkar sera nógv bólt: 11 ferðir ímóti 2 ferðum.

Drongurin hevur eisini sera ymiskar aktivitetir, 58 ymiskar ímóti 32, ið gentur hava.

Frítíðarítriv, ið bara gentur gera: spegla sær, hava náttkjólagildi, ríða og spæla flogbólt.

Frítíðarítriv, ið bara dreingir gera: fiska, sigla við leikubáti, savna frímerki, dansa føroyskan dans, spæla sterkir, spæla pinn, sláa tunnu, bøta net í máli, spæla teldukrígsspæl, spæla guitar.

**Maður:** svimur, ger jólaprýði, ger kavahús, spælir guitar.

**Kona:** fæst við urtapottar, svimur, ger jólaprýði, er í báti, ger kavahús.

**Genta:** hoppar band (4 ferðir), lesur (2 ferðir), rekur seyð (2 ferðir), sparkar (2 ferðir), speglar sær, skreiðir, ger kavamann, teknar, í báti, spælir, spælir indiáni, spælir teldu, málar egg, rullar egg, sáar karsu, plantar kjarnar, hyggur í sjónvarp, lakkar, er í náttkjólagildi, ger kavahús, ríður, gevur seyði, spælir kort, spælir flogbólt, fimleik og handbólt.

**Drongur:** sparkar (11 ferðir), rekur seyð (3 ferðir), spælir teldu (3 ferðir), lesur (2 ferðir), fiskar (2 ferðir), teknar (2 ferðir), skreiðir (2 ferðir), í báti (2 ferðir), ger kavahús (2 ferðir), siglir við leikubáti á vatni (2 ferðir), savnar frímerki (2 ferðir), dansar føroyskan dans (2 ferðir), hyggur í sjónvarp (2 ferðir), ger kavamann, spælir, hoppar band, spælir indiáni, málar egg, rullar egg, sáar karsu, plantar kjarnar, lesur

sjónvarpsskrá, spælir sterkur, spælir pinn, lakkar, slær tunnu, málar, bøtir net í máli, spælir teldukrígsspøl, spælir guitar, gevur seyði, spælir kort, ger amboðsfimleik, spælir handbólt.

**Abbi:** drekkur kaffi (2 ferðir), málar, er í báti, lurtar eftir útvarpi, lesur avís, etur appilsin, er saman við abbabørnunum.

**Omma:** bakar bollar (2 ferðir), eigur glansbíløt, eigur gamlar lesibøkur.

## Familjuleiklutur

Kona hevur nógv flest leiklutir innandura í familjuni, hon tekur sær mest av børnunum, bæði soni og dóttur (36 ferðir).

Maðurin hevur flestu familjuleiklutir uttan fyri heimið (18 ferðir). Tá ið maðurin hevur umsorgan, er tað í flestu førum fyri soninum.

**Maður:** í báti (6 ferðir), grindamaður (3 ferðir), hartar sonin (2 ferðir), hevur umsorgan fyri børnum (2 ferðir), situr undir drongi, ger bollar, svarar børnunum, bakar, pakkar jólagávur, ger kakao, vaskar gólv, er á fjalli, fiskar, kryvur, drepur veðr, drepur tarvar, flettir seyð, lærir sonin um teldur, snýtir við mati, heintar sonin í bili, vaskar bil, heingir á snór, bustar tenn við soninum, mussar góðanátt, fer til tannlækna við soni.

**Kona:** hevur umsorgan fyri børnum (5 ferðir), gongur børnum til handa (3 ferðir), er heima, tá børnini koma til hús (3 ferðir), sigur, at synirnir eru raskir (2 ferðir), ger mat (2 ferðir), keypir (2 ferðir), vaskar klæðir (2 ferðir), ger lagkøku, svarar børnunum, pakkar jólagávur, ger bollar, tosar um klæðir hjá børnum, vaskar skáp, koyrir børn í bað, lesur søgu fyri børnunum, sigur, at drongur skal klippast, heldur føðingardag fyri barni, gevur synunum drekka, tosar við børnini, ber barn í føvningi, gevur børnunum turr klæðir, spælir spøl við børnunum, hevur at børnunum, er einlig mamma, rópar sonin inn, eigur son, heintar barn, kókar egg, tímir ikki at gera pitsa og biður pápan, heintar ommuna og abban, mussar góðanátt, mjólkar kúgv, gevur børnum at eta, fær nýggjan mann, bjóðar kaffi og kaku, biður sonin um umbering, vaskar.

**Genta:** flettir bein (2 ferðir), ger ís, ger bollar, ger mat, bakar, ger jólaprýði, ger jólakort, vatnar urtapott, skjýtur seyð, stingur sperðil, ruddar úti

**Drongur:** flettir bein (2 ferðir), ger ís, ger lagkøku, ger mat, bakar, ger jólaprýði, ger jólakort, ruddar úti, vaskar rútar, greipar, heingir á fiskatræ, leggur fong í frystiboks, hjálpir pápanum at drepa tarvar, flettir seyð, skjýtur seyð, stingur sperðil, fer ørindi fyri mammu, lesur, skeldar mammuna, vaskar bil, hjálpsamur, bustar skógvar.

## Eginleikar

Gentan er tríggjar ferðir í kjóla, hon hevur reyða tasku, vinabók, seingjarklæðir, náttklæðir, føðingardagsgávu, troyggju.

Gentur tvætla, eru djarvar, sterkar, bangnar, í villareiði, vamlast við blóð, arga, eru góðar við dukkur, pliktuppfyllandi, klókar, gráta, renna skjótt, dansa, eru góðar við ommur og dýr, fótfimar, óræddar, slatra, hjálpa mammuni heima, ansa eftir systkjum, duga spøl, kenna náttúruna, eru leiðaratypur, duga at fortelja, eru happaðar, gráta og ræðast, tá seyður verður skotin, henta blómur.

Gentum dámar: at lesa, spæla við dukkur, rokna, gera fimleik, spæla teldu, ríða á hesti, ommur og dýr. Gentum dámar ikki at rokna og rudda.

Gentur eiga dukkur, dreka, dós, dunnu, dukkuvogn, barbiedukku, bólt, perlur, legokubbar, dukkuhús, barbieross, plakatir, dukkuklæðir, dukkubrúðarkjóla, vinabók.

Gentur sita í rullustóli, hava annan húðarlit, annan uppruna, eru ættleiddar, deyvar.

Dreingjaklæðini hava varieraðan lit, morreyð, gul, reyð, blá.

Dreingir gera fortreð, eru klókir, fótbóltsfjepparar, duga at skyna á klokku, lata seg í sjálvir, djarvir, góðir, sakligir, duga at ganda, cool, gráta, ræðast, tá seyður skal skjótast, tvætla, ódisiplineraðir, raskir, ólýdnir, happaðir, bangnir, sterkir, álvarsamir, øvunda gentum, teldusnillingar, spæla við bilar, heinta blómur, syngja.

Dreingjum dámar at rokna, ikki at ganga í skúla, ikki at lesa, dámar mammu, pápa og

beiggjar, vinmenn, at mála, kvøða.

Dreingir eiga flogfar, bilar, dreka, legokubbar, ringspæl, broyt, seyð, hest, ær, lomb, trø, hundar, hamara, sag, ur, knív.

**Kona:** dámar at lesa, er trygg hjá børnunum, hevur dirvi, eigur kettu, bangin, keglast við mannin, minnist merkisdagar, tosar við dóttrina, keypir blómur.

**Maður:** eigur bil, dámar at smíða, er góður við konuna, burtur í haga við soninum, kallar bát upp eftir konuni, hjálpsamur, bardagahugaður, dirvisleysur, sterkur, havisjúkur, eigur knív, óður, drepur, veit nógv um fisk, eigur kúgv, grís, hest, lamb, kálv, høsn, hund, hevur spaka, keglast við konuna, er sakligur.

**Omma:** dámar at mála, bjóðar bollar, sker breyð, bakar ofta, bindur dukkuklæðir, kykar altíð, dámar at lesa, gevur abba og ommubørnunum at eta, er góð við ommudóttrina, hevur umsorgan fyri abbanum, hartar abban.

**Abbi:** dámar at dansa, í morreyðari troyggju og føroyskari húgvu, hartar mammuna fyri vána uppaling, tosar um ávíst fólkaslag, dugir at kvøða, bakar pannukøkur, hevur heimaær.

## Kynsleiklutir í Hervør og Høgni 2001-2008

### *Samandráttur:*

Lesibókarøðin, ið byrjar umleið 2000, eru tríggjar lesibøkur um tvíburarnar Hervør og Høgna.

Ongar lesibøkur eru skrivaðar til fyrsta flokk síðan 1967, burtursæð frá at heftir við uppgávum eru gjørd, sum hava verið dúgliga brúkt til fyrstu lesiinnlæring. Her hugsi eg serliga um heftini við blomsturheitum, sum Hervør Jákupsson hevur gjørt, men sum eg ikki havi tikið við í kanning mínari.

Eg fari ikki her at tosa um pedagogiskan bygnað, tí tað liggur uttan fyri mína uppgávu, men bara viðmerkja, at tað er týðiligt, at lesibókarøðin ber brá av, at tað er fokuserað nógv uppá nýggjastu ástøðini innan lesiinnlæring. Størri dentur verður lagdur á sjálva lesiinnlæringina enn á at bera fram eina serliga føroyska kanon.

Tað at brúka eina gentu og ein drong í lesibókum er ikki eitt nýtt fyrbrigdi, hvørki her ella í øðrum londum. Tann fyrsti at gera tað hjá okkum er Poul E. Petersen við børnunum Ásu og Óla, sum seinni eru blivin brúkt í lesiheftunum hjá Hervør Jákupsson. Síðan er tað Mia og Dia hjá Steinbirni B. Jacobsen og nú Hervør og Høgni.

Við at brúka tvíburaparið Hervør og Høgna ber til at skapa eitt rúm, sum er tað sama fyri gentu og drong, ella júst ikki tað sama, men heldur eitt rúm, har til ber at bera saman og síggja mun á. Tað, ein teirra ger, ger hin eisini ella tað beint øvugta.

Í Hervør og Høgni til fyrsta flokk er dentur lagdur á javnt virði. Tað vil siga, at eitt tvíburðapar er valt sum høvuðspersónar, og tey gera í nógvum førum tað sama. Á henda hátt ber til at brúka ta pedagogisku meginregluna um endurtøkur, av tí at tekstir til so smá børn jú ikki mugu vera ov langir og fara niður í smálutir.

**Dømi:**

**Vit spæla saman**<br>
**So skeldast vit**<br>
**So gráta vit**<br>
**So blíva vit kedd**<br>
**So tosa vit saman**

Stórur dentur er lagdur á, at børnini gera tað sama. Tey eta ís, tey matgera, tey skulu í skúla, tey skulu í song, tey reka, tey spæla teldu, tey lesa, tey fiska við abbanum, tey spæla fótbólt og so framvegis.

Dentur verður eisini lagdur á, at foreldrini eru felags um uppgávur, sum til dømis at gera mat, vaska, fiska, gera jólapynt og so framvegis.

Tað er klárt, at fedrar og synir, møður og døtur eisini verða lýst siðbundið. Pápin er í báti, drongurin fiskar, gentan lesur og mamman gevur blomstrum vatn, men samanumtikið ber til at siga, at bókin lýsir eitt fjølbroyttari familjulív, enn vit eru von við, og hevur loyst eitt sindur upp fyri stívum kynsleiklutum.

Í lesibókunum til annan og triðja flokk er

mongdin av orðum munandi størri, og søgurnar gerast eisini nógv longri. Hetta hevur í hesum førinum við sær, at tær gerast meira siðbundnar, tað vil siga bæði gamaldags og stereotýpar í siðbundnum kynsleiklutum. Úrslitið er, at har bókin í fyrsta flokki leggur týðiliga dent á eina javnmetismeginreglu, fara hesar báðar bøkurnar heilt aðrar vegir.

**Nøkur dømi**

Lat meg taka nøkur dømi fram.

Ein pápi og synir hansara fara út at fiska, teir fáa nógvan fisk og koma heim, har nakað av fiskinum verður hongt til turkingar, sumt verður lagt í frystaran, men okkurt skal gerast til frikadellur dagin eftir. Leikluturin hjá mammuni er, í allari gongdini, at fortelja pápa og synum, hvussu raskir teir eru, at teir hava fingið so nógvan fisk.

Í søguni um at fletta seyð er tað í mestan mun pápar, abbar og synir, sum hava ein leiklut í flettingini. Arbeiðsgongdin steðgar við flettingini, onki verður sagt um, hvat síðan hendir við kjøtinum, tvs. um gongdina fram til, hvussu tað endar á borðinum sum matur. Gentur eru heldur ikki við í sjálvari flettingini, og hetta samsvarar ikki við veruleikan nú á døgum.

Í lýsingum av familjulívi í hesum bókum er tað týðiligt, at fokus er lagt á lívið hjá børnunum, og at børnini ofta liva sítt egna lív, leyst frá teimum vaksnu. Har tey vaksnu í familjuni koma við í søguna, eru tey lýst næstan líka so siðbundið sum í eldri tekstum, tó við teirri broyting, at leikluturin hjá kvinnunum hvørvur út í tóman heim. Á ein hátt er tað sum, at nú er tað ikki longur legalt at umtala kvinnur og køkar í sama setningi, við tí úrsliti, at henda síðan av familjulívinum, ískoytið hjá kvinnum til mat og matgerð, næstan fullkomiliga er horvin, og at kvinnur enn ikki rúmast í nøkrum øðrum leikluti.

Samanumtikið kann sigast, at býtið av kynsleiklutum í allarnýggjastu bókunum er eitt sera stórt vónbrot. Ein broyting er sjálvandi hend: tað finnast kvinnuligir lærarar, og kvinnur hava onnur lágt lønt arbeiði, so sum hjálparfólk á posthúsum, í frítíðarskúlum og hjá tannlæknum, og tær eru millum annað heimahjálp og læraraskúlanæmingar. Flestu menn eru enn kongar, nógvir eru eisini lærarar og bøndur. Harafturat hava teir høgt lønt størv sum lækni, djóralækni, prestur, skipari og tannlækni, og teir hava spennandi størv sum skúlastjóri, politistur, yrkisfótbóltsspælari, granskari. Eisini eru teir reiðarar og enntá forsetar.

# 10 MÁL OG KYNSLEIKLUTUR

Tað eru nógvir aðrir lutir í einari lesibókakanning enn júst hvørjar kynsleiklutir, vit fáa tillutaðar ella taka á okkum. Ein liður í frálæru, sum eg ikki havi tikið við her, men sum hevur týdning at nevna, er málið.

Frálæra er sett inn í eina røð av málsligum siðvenjum og brúkar ein vanliga viðurkendan hátt at greina, tosa um og geva frá sær vitan.

Frálæra er grundað á eitt tal av lærugreinum ella evnum, eitt slag av pakkatilboði av vitan, sum er skrivað og latin næmingum á ein ávísan hátt.

Henda víðarigeving av vitan er grundað bæði á siðvenju og á ástøðiliga hugsan um, hvat skal lærast, hvussu tað skal lærast, og hví tað skal lærast.

Tað, sum er áhugavert, er, at serstakir tankar og ástøði gerast ein partur av frálæruni, uttan at mann rættiliga hevur givið sær far um, hvussu teir eru blivnir partur av frálæruni, og hví eitt ávíst ástøði ella hugsunarháttur hevur fingið forrætt fram um onnur ástøði. Tey gerast eitt slag av almennari vitan, sum vit øll skulu kenna, í dag kalla vit hetta mangan kanon. Men kjarnin er, at vit ikki hugsa so øgiliga nógv um, hvussu hendan vitan verður givin víðari ella hví.

Eitt gott dømi er føroyska landnámið, har tað er trúttað niður í okkum, at tað eru menn, sum komu fyrst til landið, búsettu seg og bygdu eitt samfelag her.

Víkingar eru per definitión menn, og hvussu teir so hava megnað at fjølgast, verður yvirlatið til hugflogið.

Tað sama er við tíðini, tá kristindómurin kom til Føroya, har vit bara hoyra um Sigmund og Trónd og teirra menn og stríð.

Hetta merkir, at vit altíð hava valt at geva kunnleika um til dømis víkingatíð og um, hvussu kristindómur kom til Føroya á henda hátt, og vit brúka heilt ávísar mátar at geva hesa vitan frá okkum við einum sera maskulinum máli og til aðrar tíðir við sera maskulinum hugburði.

Mál hevur stóran týdning fyri, hvussu meiningar verða givnar víðari í frálæruni í skúlanum. Málið sjálvt og mátin, tú tosar, er stýrandi fyri, hvussu innihaldið í frálæruni verður skilt og endurskapt.

Í føroyskum máli er maskulinum normur og femininum/neutrum eru frábrigdi av maskulinum. Hetta hevur eftir mínari fatan stórar trupulleikar við sær, tí tá maðurin er normur í einum stórum høpi, er tað við til at staðfesta, at maskulinum hevur forrættindi í flestu av lívsins samanhangum og stóru spurningum.

Viðvíkjandi máli hevur orðið maður havt stórar trupulleikar við sær, av tí at tað hevur styrkt fatanina av, at menn hava framíhjárætt. Orðið merkir bæði menniskja (felagsheiti) og maður (sernevni). Men tað hava verið gjørdar víðfevndar granskingar av orðinum, sum benda á, at næmingar ikki skilja orðið maður sum eitt felagsheiti, men bert sum kallmaður.

Annað aspekt í føroyskum máli er, at orð í alt størri mun skifta kyn frá kvennkyni til kallkyn: skóg, køk, vong.

Hetta merkir, at færri og færri kvennkynsorð verða brúkt, sjálvt um tey enn eru 'loyvd' í málinum: heimur í staðin fyri verð, ørvur í staðin fyri ørv, ítróttur í staðin fyri ítrótt, upplýsingur í staðin fyri upplýsing.

Eisini er vert at nevna, at størv (tey sokallaðu nomina agentis orðini) hava flest øll kallkynsheiti, av teimum ikki at gloyma øll heiti fyri politisk størv. Hetta kann hava við sær, at vit ótilvitað binda saman størv og kallkyn. Ein møgulig avleiðing av hesum kann gerast, at tað, sum fer fram uttanfyri heimið verður fremmandagjørt í huganum á gentum/kvinnum, eins og alt tað, sum fer fram í heiminum, verður fremmandagjørt í huganum hjá dreingjum/monnum.

## Lærugreinir

Samlaði kunnleikin, sum verður víðarigivin ella er í umferð, og fatanarstig, sum eru undirskilt, verða fangað inn í eina kynsvaldandi ímynd og sambond.

Serliga hava kanningar av myndum í lærugreinunum støddfrøði, og alis- og evnafrøði víst, at fyri hvørja mynd av kvinnu eru fýra myndir av monnum, og at myndirnar av kvinnum oftast eru av húsmøðrum, sjúkrasystrum ella av bilsnum ella bangnum kvinnum.

Náttúruvísindi og støddfrøði eru serlig, tí hóast sama rák er í øðrum lærugreinum, er munurin tann, at tað hevur borið betur til at taka upp kjak um ymisk kynssjónarmið í t.d. bókmentum og søgu, meðan tað hevur víst seg næstan ógjørligt í náttúruvísindaligum lærugreinum, av tí at lærarar her hava lyndi til at trúgva, at teirra lærugrein er ópersónlig, objektiv og kynsneutral. Hendan fatanin kann vera við til at avmarka áhugan hjá gentum fyri hesum lærugreinum, av tí at frálæra og myndir eru so maskulinar. Tískil er tað av týdningi at taka upp orðaskifti um kynssjónarmið, eisini innan hesar lærugreinar.

## Dømi um mál, har kallkyn er normur:

**Úr A.C.Evensen: Harubókin**
Hann var farin at toya...
Tá ið børnini grótu, hevði mamman altíð mestan líka góð oyrur og maðurin í ævintýrinum.
...at hann skuldi svølta børn síni í hel og doyggja sjálvur í hungri...
Vilt tú vera ríkur, skalt tú gomlu trettandu nátt....
...tí tann maður, ið hann (t.e. sigursteinin) hevur, fær altíð sigur...
Tað er manna søgn...
Aðrir siga...

**H.A.Djurhuus: Barnabókin**
Orð:
Ferðamaður, morgunmaður, seyðamaður
Hann, ið eigur nógva ull og nógv kjøt, er væl farin, tí ullin er góð til klæðir, kjøtið er gott til viðskera.
Eingin svav tryggur undir lonini
Menn duga illa at tiga
...at menn sleikja sær um munnin, tá ið teir hugsa um hana (skrápspisuna)...
...menn vilja vera við...
...at siga hugsan sína fyri hvørjum manni...
Vandaleysur – frændaleysur

# 11 NORÐURLENDSK GRANSKING Í KYNI, JAVNSTØÐU OG SKÚLA

## 70'ini

Granskingin hetta tíðarskeiðið ger vart við, at skúlin ikki er kynsneutralur:

Kanningar av samrøðu í tímunum vísa at:

1) dreingir sleppa at tosa meira í tímunum og
2) at svarini frá dreingjum fáa størri týdning fyri víðari gongdina í undirvísingini.

Gentur verða ofta lýstar sum friðarligar, sosialar og sum ein einsháttaður bólkur, meðan dreingir verða lýstir sum einstaklingar.

Hetta tíðarskeið verður kyn fatað sum sosialt og mentanarliga konstruerað. Tað er ikki nakað tú ert, men nakað tú verður. Tvs. at sjálvandi ert tú eitt biologiskt kyn, men biologiska kynið fær ein kynsleiklut, sum er eitt úrslit av sosialisering.

## 80'ini

Myndin av bæði gentum og dreingum sum eitt antin/ella fyribrigdi verður meira fjølbroytt. Bæði gentur og dreingir bróta kynsmynstrið, og tað sær mangan út til at hava týdning, úr hvørjari stætt ella úr hvørjum samfelagsbólki tú stavar. Eisini hevur longdin á útbúgving hjá foreldrum ávirkan á kynsleiklutir.

Kanningar vísa, at sjálvt um dreingir mangan dominera undirvísingina, so sæst munur millum gentur úr ymsum samfelagsbólkum. Gentur, sum hava foreldur við hægri útbúgvingum, verða spurdar meira og geva longri frágreiðingar enn gentur við foreldrum við lægri ella ongari útbúgving.

Kanningar vísa eisini, at læraraleiklutirnir hava stóran týdning: í danskari kanning sæst, at gentur í einum flokki duga sera væl at argumentera, og at flokslærarin, sum er kvinna og feministur, stuðlar teimum í hesum.

Námsfrøðin leggur dent á at skapa meiri rúmd fyri gentum og at taka gerandisdagin hjá gentum við inn í undirvísingina sum evni og arbeiðshátt. Roynt verður at minka floksundirvísingina til frama fyri at arbeiða í bólkum ella sum pør og at stýra kjaki, so at øll koma til orðanna.

Endamálið er at skapa javnstøðu við at styrkja sjálvsvirðið hjá gentum.

Til dømis verður roynt at skapa undirvísing í náttúru og tøkni á fortreytir hjá gentum fyri at javna út munin á hugburði hjá gentum og dreingjum til hesar lærugreinir.

Í seinasta enda verður útbúgvingarpolitiskt sætt sum neyðugt at bróta niður markið millum ein kynsuppbýttan arbeiðsmarknað fyri at skapa sosiala javnstøðu.

Gransking og menningararbeiði við hesum fyri eyga vísir, at gentur fáa størri áhuga í lærugreinum, sum hava verið siðbundið dreingjaligar, men hevur eisini víst, at gentur og dreingir hava ymiskar mátar at fara í holt við dreingjafak: dreingir halda alis- og evnafrøði í sjálvum sær vera áhugavert, teir eru hugtiknir av tí praktiska og spælinum við tað tekniska, meðan gentur hava eina meiri teoretiska fatan av lærugreinini og eru hugtiknar av teirri síðuni.

Royndir hava verið gjørdar við kynssundurbýttari undirvísing. Hesar royndir hava víst at hava í hvussu er 3 positiv árin:

- at gentur og dreingir ikki kenna seg forðað í sínum mátum at spæla og takast við annað virksemi
- at miðvíst námsfrøðiligt arbeiði kann hava við sær, at kynsstereotypur fáa eina avbjóðing,
- og at tað ber til at leggja undirvísingina øðrvísi til rættis alt eftir, um tað eru gentur ella dreingir, ið verða undirvíst.

Negativar fylgjur kunnu vera:

- uppbýti staðfestir hugsanir um kyn sum serligt fyribrigdi
- børn, hvørs eginleikar og aktivitetir ikki eru kynsstereotypisk, verða gjørd anormal ella marginaliserast
- markið millum gentur og dreingir verður styrkt
- Hugsanin um, at gentur eru veikari í mun til dreingir, styrkist.

## 90'ini

Her vísa kanningar, at gentuleiklutirnir eru í broyting. Gentur vísa seg nú at hava ein meira dominerandi leiklut í flokkinum. Tær eru virknar, úteftirvendar, grundandi og kritiskar. Tær eru sjálvstøðugar.

Broytingarnar verða av summum sagdar at vera orsakaðar av, at sosialisering spakuliga broytist, og at kynsleiklutir í samfelag og innan mentan broytast.

## 00'ini

Her verður farið at tosa um dreingjavinaliga námsfrøði.

Hetta slag av námsfrøði leggur dent á trotið á mannligum fyrimyndum í skúlanum. At mannligir samveruformar eru rímiligir, t.d. kapping, action og kropslig handling. Atfinningar móti hesari námsfrøði knýta seg at tí ivasama í at varðveita siðbundnan maskulinitet, og at námsfrøðin hvílir á einari fatan av kyni, sum grundar seg á kynsspesifikkar eginleikar, sum kunnu broytast.

Í praksis hevur hetta við sær orðaskifti um feminiseraðan barndóm, femininan skúla, tað neyðuga í at hava fleiri mannligar námsfrøðingar og lærarar, sum kunnu vera fyrimyndir hjá dreingjum. Hetta er orðaskifti, sum fær stóra rúmd í miðlunum.

PISA úrslitini, har gentur vísa seg at fáa bestu úrslitini, serliga innan mál, ger kjakið enn aktuellari.

Nýggjari gransking leggur størri dent á at loysa upp fyri stereotypum og sær uppvaksandi ættarliðið sum øðrvísi, av tí at bæði kyn kunnu átaka sær so øgiliga nógvar leiklutir bæði av maskulinum og femininum slag.

Tað verður eisini granskað í heteroseksualiteti í sambandi við møguleikan at vera tvíkyndur.

Hetero er normurin og ger, at homoseksualitetur verður ósjónligur. Tað verður roynt at vísa á homofobi í lesiætlanum, skúlabókum, undirvísing og í skúlagarði.

Heteroseksualitetur er jú ein partur av tí at skapa tvey ymisk sosial kyn: gentu og drong.

Tað er ikki gjørd so nógv gransking av, í hvønn mun kyn á lærara ávirkar næmingar og undirvísing. Tað, sum hevur verið granskað í hesum, kemur fram til, at tað ikki er stórvegis munur á kyni í mun til, hvussu undirvísing verður løgd til rættis og gjøgnumførd. Tað er heldur ikki vanligt, at fyrrverandi næmingar leggja serligan dent á, hvat kyn lærarin hevur haft.

Kyn var fyrr fatað sum biologi/mentan, men verður í dag serliga tillagt týdning av mentan. Hetta merkir, at tað fyrr var vanligt at leggja dent á, at børn komu í heimin við eginleikum, sum myndaðu kynið á ávísan hátt, alt eftir um barnið var genta ella drongur. Myndaliga ber til at siga, at gentan var ljósareyð og drongurin ljósabláur. Sum fráleið og serliga, tá ið komið var inn í sjeytiárini, legði granskingin dent á, at mentan hevði nógv størri ávirkan á kynið og tann leiklut, barnið ognaði sær ella fekk tillutaðan. Longur upp vit nærka okkum, størri dentur verður lagdur á mentan, og í summum førum verður arvur sagdur als onga ávirkan at hava á kynsleiklut. Hendan fatan fekk eisini ávirkan á uppaling og undirvísing. Í dag er tó aftur lyndi til at draga fram tað ljósareyða og ljósabláa. Eitt nú verða bøkur gjørdar, sum leggja stóran dent á at bera fram sjónarmið um gentur sum prinsessur og dreingir sum sjórænarar. Eisini verða serligar ævintýrbøkur gjørdar til gentur og serligar til dreingir.

# 12 SAMANDRÁTTUR

LØGTINGSLÓG NR. 125 FRÁ 20. JUNI 1997 UM FÓLKASKÚLAN, SUM SEINAST BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 64 FRÁ 7. JUNI 2007

## Kapittul 1

### *Endamál fólkaskúlans*

§ 1. Fólkaskúlin er tann almenni skúlin, sum býður undirvísing eftir hesi lóg.

§ 2. Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.

Stk. 2. Fólkaskúlin eigur at skapa sovorðin líkindi fyri uppliving, virkishugi og djúphugsan, at næmingarnir kunnu menna sína sannkenning, sítt hugflog og hug til at læra, og at teir kunnu venja síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan og búnast í treysti til sín sjálvs og til teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum.

Stk. 3. Fólkaskúlin skal í sátt og samvinnu við foreldrini hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling. Hann skal við støði í heimligari mentan menna kunnleika næminganna um føroyska mentan og hjálpa teimum at fata aðrar mentanir og samspæl manna við náttúruna. Hann skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.

### Samanumtikið:

Tað verður sum so ikki skrivað meira um dreingir heldur enn um gentur í føroyskum lesibókum. Tað, sum er áhugavert, er ikki bara biologiska kynið, men eisini tað sosiala kynið, og við hesum í huga ber til at seta spurningin, um kynini bera seg at, sum vit vænta av teimum, ella um tey bróta frá.

At síggja til eru tey bara børn, men tað er bara at síggja til, tí drongur og genta skapa eina væntan í lesaranum av, at tey fara at bera seg at á heilt ávísar mátar, ein væntan, sum siðvenjan hevur skapað í okkum.

Tað, sum tó er gjøgnumgangandi, er, at gentur og kenslur hoyra saman, og dreingir og handling hoyra saman.

Tað sæst ikki bara í børnunum í søgunum, men eins nógv í teimum vaksnu, og oftast í mammuni og pápanum.

Mammurnar vaska, gera mat, fara til handils, ugga børnini, leggja at sova, lata í, svara ella fáa ikki svarað filosofiskum spurningum, sum børnini spyrja, og so bjóða tær ofta drekkamunnar.

Páparnir geva seyði, fiska, teir arbeiða uttandura, tað vil siga, at teir eru burturstaddir og koma heim. Teir svara eisini spurningum frá børnunum, og sum oftast eru teir førir fyri at svara. Teir leggja eisini onkuntíð børnini at sova.

Ommurnar gera eisini mat, baka og fortelja søgur.

Abbar ganga túr og fortelja ymiskt áhugavert, meðan teir ganga túr.

Samanborið við fyrr, so var í føroyskum lesibókum nógv at lesa um djór, nógv ævintýr, fáplar, sagnir, um náttúru, um arbeiði, serliga á bø og á sjónum.

Nú eru flestu søgurnar um gerandisdagin hjá børnum, men framvegis er ein stórur partur bygdur á siðbundna fatan av arbeiði á sjógvi og landi, at pápar og synir fiska, fletta, fara í grind o.s.fr., og at mammur fáast við húsligt arbeiði, eru altíð heima, tá børnini koma úr skúla og taka sær av kensluliga partinum viðv. børnum.

Munur er tó á, hvussu lýsingin er av arbeiði; uttandura arbeiði verður sera nágreiniliga lýst, meðan innandura arbeiði er nakað, sum er horvið: maturin stendur bara knappliga á borðinum uttan frágreiðing.

Eisini eru lesibøkur farnar at taka onnur evni upp: t.d. brekað, ættleidd, børn við øðrum húðarliti, happing, einligar mammur, hjúnaskilnað og ymsar mátar at trúgva, men hetta er bara sporadiskt, og summi evni verða enn ikki tikin uppá tungu. Her kann bert nevnast, at børn kunnu vaksa upp saman við samkyndum foreldrum.

Samanumtikið má sigast, at maðurin framvegis er normur og kvinnan eitt, sum brýtur frá, gjørd úr rivjabeininum so at siga. Heteroseksualitetur er normur og homoseksualitetur brýtur frá, eins og kjarnufamilja er normur og einligir uppihaldarar bróta frá. Familjan er grundað á siðbundnar leiklutir, har menn eru úti allan dagin ella eru sjómenn, meðan kvinnur eru inni og gera mat, vaska og taka sær av børnum. Gentur spæla nógv við dukkur, og dreingir sparka fótbólt og spæla teldu.

Tað er merkisvert, at fyrstu ferð sagt verður frá kvinnum við løntum starvi er í 2001, tá tær eru lærarar. Um sama mundi tekur orðaskifti seg upp um, at skúlin er vorðin ov kvinnuligur og um, at dreingir hava torført at fóta sær í skúlanum.

Kvinnur hava altíð tikið sær av børnum, bæði gentum og dreingjum. Í Føroyum hava kvinnur enntá verið vanar við, at tær hava alt børnini upp einsamallar, meðan menninir hava verið til skips í long tíðarskeið.

Kanska er ein partur av frágreiðingini til tann torskilda spurningin um vantandi trivnaðin hjá dreingjum í skúlanum, at vit í undirvísingar-tilfarinum og í tí, sum verður væntað av teimum, tilluta teimum eitt ideal, sum er langt frá, hvussu veruleikin sær út, og sum teir tískil ongan møguleika hava at kenna seg aftur í. Í teimum allarnýggjastu lesibókunum fáa dreingir framvegis tillutað leiklutir sum kongar, bøndur og seyðamenn, og tað hevur jú í mongum føri lítið og onki samband við veruleikan.

Vit vita eisini, at tíðin er farin, tá ið dreingir, sum ikki tímdu at ganga í skúla, bara kundu fara til skips. Hesum fæst prógv fyri við at hyggja at tølunum frá Hagstovuni, sum vísa, at talið av t.d. fiskimonnum minkar alsamt. Uttan útbúgving hava teir skúlatroyttu dreingirnir heldur ikki nógvar møguleikar á landi. Tað alsamt minkandi talið av arbeiðsplássum fyri ófaklærd er ikki eitt serføroyskt fyribrigdi, tí allastaðni í Vestur-

## Kynsleiklutir 1907-1967




**Aðrir leiklutir - kvinnur**

Bindingarkona, bróstakona, dadda, drotning, handilskona, hoykona, kirningarkona, kópakona, køkshjálp, neytakona, nunna, prestufrúa, purka, seymikona, tíningarkona, tókona, vevkona

**Aðrir leiklutir - menn**

Skipari (3), eingil (2), fiskimaður (2), herhøvdingi (2), huldumaður (2), lækni (2), lærari (2), smiður (2), tænari (2), øskudólgur (2), amtmaður, andøvsmaður, bakari, bátasmiður, biskupur, bispur, brúðmaður, djóralækni, drykkjumaður, fjallmaður, húskallur, jallur, jólamaður, keisari, kokkur, kolmeistari, ráðharri, rossadrongur, seyðatjóvur, sjómaður, skipsreiðari, skraddari, sláttumaður, snikkari, spunamaður, sýslumaður, trælur, valdmaður, veiðimaður, veltingarmaður, vísmaður

Kynsleiklutir 1980-2008




**Aðrir leiklutir – kvinnur**
Kongsdóttir (3), arbeiðskona (2), grýla (2), huldukona (2), kelling (2), posthússtarvsfólk (2), eingil, frítíðarheimshjálpari, handilskona, heimahjálp, jomfrú, keisari, kokkur, kongur, lækni, læraraskúlanæmingur, matmóðir, neytakona, prestafrúa, sunnudagsskúlalærari, tannlæknahjálpari, teknmálstulkur, trúboðari

**Aðrir leiklutir – menn**
Keisari (3), risi (3), sjómaður (3), smiður (3), teldusølumaður (3), djóralækni (2), eingil (2), fangavørður (2), jólamaður (2), postboð (2), próstur (2), ráðharri (2) tannlækni (2), trælur (2), tænari (2), veiðimaður (2), andøvsmaður, fimleikavenjari, forfaðir, forseti, greivi, herhøvdingi, hermaður, hertugi, hovmaður, jallur, kattakongur, kongabarn, listamálari, koyrilærari, løgtingsmaður, myllari, njósnari, politistur, ránsmaður, riddari, rossadrongur, seyðatjóvur, skipseigari, skraddari, skúlastjóri, spælimaður, stýrimaður, sunnudagsskúlalærari, sýslumaður, trúboðari, trøll, upplesari, vaktarmaður, valdmaður, víkingur, vísindamaður, yrkisfótbóltsspælari, øskudólgur

heiminum er sama gongd at síggja.

Uppgávan, eg setti mær, var at finna útav, hvussu kynsleiklutir hava skikkað sær í eini tíðargongd á umleið 100 ár.

Har má eg staðfesta, at tað sæst lítið fjølbroytni í kynsleiklutum hjá gentum og kvinnum. Tær hava eisini fingið tillutaðar munandi færri leiklutir enn dreingir og menn. Hjá monnum og dreingjum sæst eitt munandi størri fjølbroytni, og teir hava fingið tillutaðar nógv fleiri leiklutir.

Í nýggjastu lesibókunum hava kvinnur fingið nakrar fáar eyka leiklutir, sum í allarflestu førum eru innan láglønt størv. Hinvegin hava menninir fingið nógv fleiri leiklutir, og teir eru einamest at finna innan hálønt størv og innan størv við nógvari prestigu og status.

Familjumynstrið broytist tó nógv: meðan familjan fyrr var ein eind, har børn og vaksin tóku lut í lívinum hjá hvør øðrum, hendir ein broyting fram ímóti, at børn og vaksin liva í sundurskiltum verðum, skilt á tann hátt, at tað er serligt virksemi fyri børn, sum vaksin ikki hava lut í.

Tað, sum eftir mínum tykki er merkisvert bæði í eldri og yngri tekstum, er manglandi forteljingin um serligu kvinnuligu uppgávurnar, sum til dømis fyrr í tíðini at fara í hagan og mjólka kúnum, jarðarmóðurarbeiði, sum var eitt sera krevjandi arbeiði bæði viðvíkjandi tí at skula hjálpa kvinnum at eiga uttan at hava samband við sjúkrahús ella læknar og viðvíkjandi tí langa vegnum, sum skuldi gangast og siglast, fyri at koma til hennara, sum skuldi eiga. Aðrir leiklutir sum t.d. sjúkrarøktarfrøðingurin og flakakvinnan verða heldur ikki lýstir í tekstunum.

Tað er harumframt týðiligur munur á beinleiðis fyrimyndum í lesibókunum. Hetta sæst á talvuni á bls. 45. Fyrimyndirnar eru tær flestu úr trúarlívi og søgu, og meðan mannligar fyrimyndir økjast, sum árini líða, kann ikki sigast tað sama um tær kvinnuligu fyrimyndirnar.

## Fyrimyndir 1907-2008

**Kendir menn í A.C.Evensen**
Gud (9), Jesus (5), Fríðrikur sjeyndi, Sankta Mortan

**Kendir menn í H.A.Djurhuus**
Gud (4), Jesus (2), David, Jákup Gulaksson, Pløyen, Sigmundur, Tróndur

**Kendir persónar í Lesibók til 2-3. skúlár, 1981-1984**
**Menn:**
Gud (19), Jesus (9), Illimaður (2), Sankta Mortan (2), Ábraham, Tórir Beinisson, Sigmundur Brestisson, Dia hjá Sáru, Esop, A.C.Evensen, Jens Christian Evensen, Jákup Gulaksson, Jákup Hansen, Hildibrandur, Hákun jallur, Jóhannes apostul, Ólavur kongur, Ólavur Heilagi, Pløyen, Rasmus Rasmussen, Sjúrður Sigmundarson, Símun av Skarði, Torkil Turrafrost, Úlvur

**Konur:**
Jomfrú Maria, Marita, Turið

**Kendir persónar í Hervør og Høgni í skúla/Hervør og Høgni og hini/Hervør og Høgni í triðja**
**Menn:**
Jesus (6), Dávid (3), Gud (2), Jósef (2), Augustus, Sigmundur Brestisson, Castor, Hans A. Djurhuus, Einar, Albert Einstein, Eldjarn Kambhøttur, Geyti Reyði, Goliat, Jens Olivur Lisberg, Lukas apostul, Martin Luther, Sankta Mortan, Óðin, Pollux, Hr. Poul, Steingrímur, Svínoyar Bjarni, Sjúrður Tollakssonur, Tór, Torgrímur og synir, Tórður Lági, Tórir, Tróndur í Gøtu, Tyndareus, Týr, Vivaldi, Zeus, Leivur Øssursson
**Konur:**
Beinta, Cassiopia, Clara Einstein, Frigg, Elsa Jacobsen, jomfrú Maria, drotningin av Sparta, Turið megineinkja

At so fáar kvinnuligar fyrimyndir hava verið og framvegis eru í undirvísingartilfarinum, sum hendan kanning fevnir um, kann óivað setast í samband við, at tað eru 21 kvinnur, ið hava skrivað 70 tekstir og 59 menn, ið hava skrivað 736 tekstir í hesum ellivu lesibókunum fyri børn, sum ganga í 1. til 3. flokki.

Fyri at taka samanum, byrjaði eg í hesum partinum við at endurgeva endamálsorðingina fyri fólkaskúlan. Har verður í § 2, stk. 3 sagt, at undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.

Tað er synd at siga, at nøkur serlig átøk eru gjørd frá almennari síðu fyri at seta fokus á javnvirði millum kyn í føroyska fólkaskúlanum. Eg kann ikki í skrivandi løtu koma fram á nakað dømi. Tað, at skúlin nú verður sagdur at vera betur hóskandi fyri gentur, er ikki eitt úrslit av, at tað frá almennari síðu er sett nakað serligt í verk fyri at sleppa gentum meira framat. Heldur er ein broyting farin fram í samfelagnum sum heild, sum so sjálvandi eisini ávirkar skúlan.

Á ráðstevnu, ið varð hildin í Føroyum í juni 2009 um javnstøðu í skúlanum, helt Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, røðu og vísti á virkisætlan fyri undirvísingarøkið fólkaskúlans í sambandi við javnstøðu. Hon nevndi m.a. at Mentamálaráðið fer at taka javnrættindaperspektivið við í arbeiðið at orða faklig og námsfrøðilig endamál í øllum lærugreinum, at hon fór at mæla til eina evnisviku í skúlanum í skúlaárinum 2010-11, har evnið skuldi vera javnrættindi, og at hon fór at raðfesta gerð av frálærutilfari, sum lýkur krøvini í javnstøðulógini.

Ein av kanningarspurningunum frá Javnstøðunevndini var, um tað bar til at gera ein frymil fyri, hvussu undirvísingartilfar kann gerast við hugburðinum um javnstøðu millum kyn í huga. Eg ivist ikki í, at tað ber til. Slíkir frymlar eru gjørdir til so mangt annað. Eg kann t.d. nevna, at Norðurlandaráðið hevur gjørt eina nýtsluleiðbeining fyri kynsbrillur, skilt á tann hátt, at eitt virki brúkar kynsbrillur at kanna sítt egna virksemi fyri at tryggja, at tað livir upp til kravið um javnvirði. Nýtsluleiðbeiningin eitur Integrering av likestillingsperspektivet i nordisk samarbeid. Bruksanvisning for kjønsbriller.

Sama kann helst gerast, tá farið verður undir at gera frálærutilfar, men eg haldi, at slíkir frymlar mugu gerast saman við teimum, ið arbeiða við at framleiða skúlabøkur. Vónandi kann hendan kanning vera ein stuðul undir hesum arbeiði.

13

# KELDUR


J. Abraham: Teacher Ideology and sex-roles in curriculum texts.
British journal of sosiology of Education 1989, vol. 10, nr. 1, bls. 33-51

Sólgerð Andreassen: Spjaðing í fólkaskúlanum. Skúlablaðið nr. 3/2005

Kirsten Brix: "Vága at bróta mynstrið." Skúlablaðið nr. 4/2001

Linda Carlswärd/Anna Lindman: Mor ror. Far är rar.
En analytisk studie av genus i läromedel i engelska och franska i gymnasieskolan.
Estetisk-filosofiska fakulteten/Pedagogik. Karlsstads universitet 2006

Amanda Coffey & Sara Delmont: (Re)producing and (Re)defing Knowledge(s) í Feminism and the Classroom Teacher. Research, Praxis and Pedagogy. Routledge/Falmer London & New York 2000

M. Commeyras & D.E.Aldermann: Reading about women in world history textbooks from one feminist perspective. Gender and Education, 1996, vol. 8, nr. 1, bls. 31-48

Firouz Gaini: Miðlar, mentan og seinmodernitetur. Fróðskapur 2008

Maria V. Hansen: Skúlin fyri gentur og dreingir – ella kanska serliga gentur? Skúlablaðið nr. 5/2008

Sigrun Hjalmarsdóttir: Lesibókin. Hin gloymda barnabókin. Føroyskar lesibøkur 1891-1990. Fróðskaparsetur Føroya 1998

Jóhannes Eli Iversen: Kynsbýtið í fólkaskúlanum – og hví. Skúlablaðið nr. 2/2004

Marna Jacobsen: Í kríggj móti konum. Skúlablaðið nr. 6/2007
Marna Jacobsen: Javnleikur í bókum. Dimmalætting 5. mars 2009
Marna Jacobsen: Kynsleiklutir í føroyskum lesibókum. Skúlablaðið nr. 5/2009
Marna Jacobsen: "Kærlighed begynder med kast." Skúlablaðið nr. 1/2005
Marna Jacobsen: Nýggj bók við gomlum hugsjónum. Skúlablaðið nr. 6/2005
Marna Jacobsen: Signalvirði, ella spillir navnið ongan? Dimmalætting 30. januar 2007

Annika W. Joensen: Gentur eru fittar, og dreingir eru raskir. Skúlablaðið nr. 2/2004

Don Eyðbjarnarson Joensen: Kallurin trívist ikki. Skúlablaðið nr. 1/2010

Turið Kjølbro: Fimti hvør lærari ikki í skúlaverkinum. Skúlablaðið nr. 1/2003
Turið Kjølbro: Kvinnurnar yvirtaka fólkaskúlan. Skúlablaðið nr. 2/2002
Turið Kjølbro: Skal tað verða lættari hjá mannfólki at sleppa inn á Læraraskúlan? Skúlablaðið nr. 3/2004
Turið Kjølbro: Skúlabøkur skulu svara til javnstøðulógina. Skúlablaðið nr. 6/2003

Birita Krossteig: At lata seg í eftir umstøðunum. Skúlablaðið nr. 6/2004

Glennys Lobban: Sex-roles in Reading Schemes. Educational Review 1975, vol 27, nr. 3, bls. 202-210

Regin Tausen Midjord: Tað veikara kynið. Skúlablaðið nr. 6/2006

Norden desember 2009. Integrering av likestillingsperspektivet i nordisk samarbeid. Bruksanvisning for kjønsbriller.

Bergur Rasmussen: Yvirtikni skúlin: Møðravald, ella ein avbjóðing til tann føroyska skúlaungdómin? Skúlablaðið nr. 3/2004

Kirsten Reisby/Susanne V. Knudsen: Køn, ligestilling og skole 1990-2004. NIKK januar 2005

Åse Røthing: Kjønn og seksualitet i grunnskolens læreplaner. Historisk tilbageblik og aktuelle udfordringer. Norsk Pedagogisk Tidskrift. Nr. 5, 2005, árgang 88/ síða 356-368

Beate L. Samuelsen: Lærarayrkið í dag appelerar til kvinnur. Dimmalætting nr. 21, 30. januar 2009

Erla Sigurðardóttir (ritstj.): Ligestilling i Norden. Rapport fra nordiske konferencer i Tórshavn og Reykjavík under Islands formandskab i Nordisk Ministerråd. TemaNord 2010:552

Sonne Smith: [Lerindan]. Skúlablaðið nr. 7/2002

Thurid Thomsen: Børn hava rætt til javnstøðu. Dimmalætting nr. 82/ 30. apríl 2008

Inga Wernersson: Genusperspektiv på pedagogik. Högskolverket 2006
Inga Wernersson: Könsdifferentiering i grundskolan: Göteborg studies in educational sciences; 22, 1977

MARNA JACOBSEN - KYNSLEIKLUTIR Í FØROYSKUM LESIBÓKUM 1. - 3. flokk

JAVNSTØÐUNEVNDIN

Javnstøðunevndin